BÚSKAPARRÁÐIÐ

## Á heysti

# 2016

# Búskaparfrágreiðing

I. Konjunkturmeting

II. Um raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins

III. Kommunubúskapurin

## September 2016

Economic report from the *Economic Council of the Faroe Islands*, Autumn 2016, with Executive Summary in English: (I) Economic outlook, (II) priorities made in the work of the council, and (III) the economic management of the municipalities

Redegørelse fra det *Økonomiske Råd på Færøerne*, efterår 2016: (I) Udsigterne for konjunkturudviklingen, (II) prioriteringer i det økonomiske råds arbejde, og (III) økonomistyringen i kommunerne

ISBN: 978-99918-3-491-7

# Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Tað er ásett í lógini fyri Búskaparráðið, at tað skal gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.

Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við avtalu løgd til Fróðskaparsetur Føroya at røkja.

Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð við seinni broytingum skal koma út tvær ferðir um árið.

Frágreiðingin hesuferð fevnir um tríggjar partar:

- Kapitul I: Konjunkturmeting heystið 2016
- Kapitul II: Raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins
- Kapitul III: Stýringin av kommunala búskapinum

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílur á heimasíðu Búskaparráðsins á Fróðskaparsetrinum: http://setur.fo/buskaparradid/ (undir "frágreiðingar" (í erva til vinstru).

Limir Búskaparráðsins eru:

Sverri Hansen, *cand.oecon., formaður*

Thomas Dam, cand.merc.

Herit V. Albinus, MSc Econometrics and Mathematical Economics

Skrivaratoymi Búskaparráðsins:

Ólavur Christiansen, *cand.polit., PhD, lektari*

Hans Ellefsen, *cand.scient.oecon., PhD, ráðgevi (til 1. mai 2016)*

# Innihald

Samandráttur av konjunkturmeting og serligum greiningum ........ 6

Kapitul I: Konjunkturmeting heystið 2016 ........ 9

I 1 Inngangur um konjunkturmeting við høvuðstølum ........ 10

I 1.1 Eftirspurningurin ........ 13

I 1.2 Haldførið og tað langa siktið ........ 15

I 1.3 Bústaðarmarknaðurin ........ 15

I 1.4 Vinnuviðkomandi bygnaðarbroytingar ........ 16

I 1.5 Laksa- og oljuprísir ........ 20

I 1.6 Handilsjavnin ........ 21

I 2 Innlendis eftirspurningur frá húsarhaldunum (privat nýtsla) ........ 23

I 2.1 Metingar viðvíkjandi privatu nýtsluni ........ 23

I 2.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum) ........ 24

I 3 Virksemið í privatu vinnugeirunum (privatar íløgur oa.) og innlendis eftirspurningurin ........ 27

I 3.1 Gongdin viðvíkjandi lønargjaldingum og løntakaratali ........ 27

I 3.2 Gongdin viðvíkjandi privatu íløgunum ........ 30

I 3.3 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum) ........ 31

I 4 Innlendis eftirspurningur frá almenna geiranum (almenn nýtsla og íløgur) ........ 33

I 4.1 Nýtsla hins almenna ........ 33

I 4.2 Íløgur hins almenna ........ 33

I 4.3 Úrslitið á almennu roknskapunum ........ 34

I 4.4 Ogn og skuld hjá tí almenna ........ 35

I 5 Útlendskur eftirspurningur (netto og brutto) ........ 37

I 5.1 Gongdin innan alivinnuna ........ 37

I 5.2 Gongdin innan uppisjóvarvinnuna ........ 38

I 5.3 Botnfiskur og onnur fiskasløg ........ 39

I 5.4 Samlaði fiskavøruútflutningurin ........ 39

I 5.5 Gongdin í handilsjavnanum ........ 40

I 5.6 Nettoútflutningurin av tænastum ........ 41

I 6 Samandráttur av fortreytum sum grundarlag fyri framrokningum við myndli ........ 42

Kapitul II: Um raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins ........ 43

II 1.1 Arbeiðshættir, avmarkingar og eftirspurningurin eftir arbeiði ráðsins ........ 44

II 1.2 Málsevni tikin fram eftir týdningi ........ 44

II 1.3 Tilmæli um at skilja millum stutta og langa siktið ........ 45

II 1.4 Týdningurin av búskaparpolitiskum haldføri ........ 48
II 1.5 Demografiska avbjóðingin lýst eitt sindur øðrvísi ........ 50
II 1.6 Møta demografisku avbjóðingini við vøkstri í strukturellum arbeiðsvirkni? ........ 52
Kapitul III Kommunubúskapurin ........ 53
III 1.1 Søguligar dagføringar á kommunala økinum ........ 54
III 1.2 Greiningar og álit um kommunuviðurskifti ........ 54
III 1.3 Stutt yvirlit yvir kommunalar uppgávur ........ 56
III 1.4 Royndirnar frá eldrarøktar-økinum – niðurstøður og tilmæli ........ 57
III 1.5 Málið um kommunala útjavning (á inntøkusíðu- og útreiðslutørvssíðu) ........ 59
Appendiks 1 til kapitul III: Greiningar við støði í Búskaparskipan Landsins ........ 61
Appendiks 2 til kapitul III: Demografi-gongdin í kommununum seinastu árini ........ 66
Tilvísingar/keldutilfar ........ 71
Yvirlit yvir talvur og myndir/tables and figures ........ 73
Orðalisti ........ 76
Tíðindaskriv frá Búskaparráðnum 1. september 2016 ........ 82
English Summary ........ 83

# Samandráttur av konjunkturmeting og serligum greiningum

*Kapitul I í frágreiðingini* fevnir um eina meting av konjunkturgongdini.

Óvanliga gongdin í føroyska búskapinum seinastu árini og tvørrandi upgerð av tjóðarroknskapi í føstum prísum hava gjørt tað trupult at gera stuttsiktaðar forsagnir. Hendan hálvárliga endurmetingin hevði við sær at vøksturin í BTÚ í ársins prísum fyri 2015 og 2016 er mettur nakað hægri enn í undanfarnu frágreiðing.

Konjunkturfrágreiðingin er skipað í avsnitt eftir eftirspurnarpørtunum (útreiðslupørtunum) í BTÚ. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur frá tveimum síðum: frá innlandi sum eftirspurningur til nýtslu og íløgur, og frá útlandi sum eftirspurningur eftir útflutningi netto.

Hagstovan og Búskaparráðið hava í felag mett um BTÚ-vøksturin í ársins prísum árini 2014-2017. Seinastu tjóðarroknskapur er fyri árið 2013, og ongin broyting er gjørd í metingunum fyri 2014-2015. Til tess at gera metingina fyri 2016 og 2017 er nýttur ein búskaparmyndil, sum er mentur í Landsbankanum og á Hagstovuni, og viðlíkahildin av Búskaparráðnum og Hagstovuni í felag. Niðanfyri standandi metingar eru gjørdar av vøkstrinum í BTÚ í ársins prísum árini 2014-2017 og drívmegini aftanfyri vøksturin:

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| Mettur vøkstur í BTÚ í ársins prísum: | 5,8% | 6,2% | 8,5% | 4,1% |
| Vøksturin stavar frá: | Útlendskum eftirspurningi | Gott 60% innlendis eftirspurningi | Knapt 60% innlendis eftirspurningi | Innlendis eftirspurningi |

Meðan nýtslan hevur verið tann mest støðugi parturin av innlendis eftirspurninginum, hava íløgurnar verið tann mest sveiggjandi parturin. Almennu íløgurnar sum partur av innlendis eftirspurninginum hava í Føroyum vanliga verið konjunktur-viðgangandi. Sama hevur verið galdandi fyri almennu nýtsluna. Hetta hevur altíð verið óheppið og kann endurtaka seg nú íløguætlanir landsins og kommunanna eru sera víðfevndar fyri árini 2016 og 2017. Tørvur sýnist vera á eini samskipaðari endurskoðan av almennum íløguætlanum. Tørvur er eisini á eina samskipan millum lands- og kommunubúskapin. Hetta kundi verið gjørt við m.a. at víðka játtanarkarmarnar landsins til eisini at fevna um kommunurnar.

Handilsjavnin hevur fyri tíðina størri yvirskot enn nakrantíð. Ein orsøk er betraða býtislutfallið í uttanlandshandlinum við øktum laksaprísum og minkandi oljuprísum. Eisini hava størru nøgdirnar av uppisjóvarfiski ávirkað úrslitið.

Búskaparligu indikatorarnir í seinastuni benda annars á ein týðuligari hákonjunktur við lágum arbeiðsloysi, nettotilflyting og búskaparvøkstri. Undir hesum umstøðum átti landsroknskapurin at víst eitt stórt yvirskot. Sum nevnt í undanfarnu frágreiðing skeiklar nýtslan av inntøkunum frá forskattingini av pensjónum til fígging av skattalætta sonnu myndina av haldførisstøðu landsins í langa siktinum.

---

*Kapitul II gevur eina frágreiðing um raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins*

Í undanfarnum frágreiðingum í 2015 og 2016 hevur Búskaparráðið lagt serligan dent á at lýsa ta *fíggjarligu haldførisavbjóðing*, sum *almenni geirin í Føroyum* vegna broytt aldursbýti kemur at standa í um ikki so langa tíð.

Hesa haldførisavbjóðing - og viðurskifti tengd at hesi haldførisavbjóðing – hevur sitandi Búskaparráð mett sum eitt hitt mest viðkomandi búskaparevni at fáa lýst í sínum 4-ára skeiði, herundir at fáa útroknað í tølum. Í hesum sambandi mælir Búskaparráðið til eina uppraðfesting av einum búskaparpolitikki, ið er vendur ímóti tí langa og millumlanga siktinum í búskapargongdini.

Eitt er stutta siktið í konjunkturgongdini, annað er langa og millumlanga siktið í búskapargongdini. Búskaparráðið metir at ov stórur dentur hevur verið lagdur á stutta siktið, og at myndugleikin eigur at leggja neyvari ætlanir sum fevna um millumlanga (td. 10 ár fram) og langa siktið (td. 25 ár fram).

Konjunkturar koma og fara. Neyvan nakar ivast í, at lágkonjukturur kemur aftur, men nær veit eingin við vissu. Búskaparráðið metir at seinasta gongdin í fólkatalinum, nettotilflytingini og í arbeiðsloysinum í ein stóran mun eru konjunkturtreytað. Sama er galdandi fyri gongdina í øðrum búskaparligum lyklatølum í seinastuni. *Búskaparráðið er av tí fatan, at meira dentur eigur at verða lagdur á tann búskaparvøkstur, ið er ótreytaður av konjunkturum. Hetta merkir at meira ansur eigur at verða givin útboðssíðuni í búskapinum.*

Viðkomandi kann vera at skilja ímillum tvey sløg av búskaparvøkstri:

(1) ***Búskaparvøkstur í tí stutta siktinum,*** ið verður íbirtur og hildin uppi av konjunktursveiggjum. Vanliga er hesin búskaparvøkstur íbirtur og hildin uppi av broytingum í ***eftirspurnarsíðuni*** í búskapinum, t.v.s. "stoytum" sum til eitt mark geva "sjálvforsterkandi" broyting í eftirspurningi frá almennari og privatari nýtslu og íløgum og frá nettoútflutningi. Í Føroyum kunnu slíkir "stoytir" tó lættliga byrja á útboðssíðuni - í fiskiveiðu og aling - og harnæst avgerandi ávirka alla eftirspurnasíðuna gjøgnum ávirkanina á nettoútflutningin.

(2) ***Búskaparvøkstur í tí langa siktinum,*** ið verður íbirtur og hildin uppi av øðrum viðurskiftum enn konjunktursveiggjum, og serstakliga av tøknitreytaðum (tvs. ikki-konjunkturtreytaðum) broytingum í arbeiðsproduktiviteti og broytingum í ikki-konjunkturtreytaðum arbeiðsvirkni. Hesin búskaparvøkstur er sostatt íbirtur og hildin uppi av broytingum í framleiðsluførleikanum á **útboðssíðuni** í búskapinum.

Tað eru nøkur týðandi poeng við í størri mun at venda ansinum móti skilnaðinum millum *stutta og langa siktið*. Tað er ivaleyst soleiðis at búskaparpolitisk tiltøk, sum ávirka búskaparvøkstur og arbeiðsvirkni í *stutta siktinum* (eftirspurnarsíðuni í búskapinum), ikki gagna stórvegis í tí *langa siktinum* (útboðssíðuni í búskapinum). Og øvugt – at búskaparpolitisk tiltøk, ið skapa búskaparvøkstur og arbeiðsvirkni í langa siktinum, ikki gagna stórvegis í tí stutta siktinum.

Tað BTÚ-ið, sum verður gjørt upp av Hagstovuni, fevnir bert um tað *faktiskt staðfesta BTÚ-ið*. Hetta *faktiskt staðfesta BTÚ-ið* hevur í sær íkast frá konjunktursveiggum, eins væl og íkast frá ikki-konjunkturtreytaðum produktivitetsvøkstri og arbeiðsvirknisvøkstri.

Fíggjarmálaráðið er byrjað at nýta serligar roknihættir til tess at "reinsa" *faktiskt staðfesta BTÚ-ið* fyri ávirkanum av konjunktursveiggjum. Úrslitið verður *ein roknað stødd fyri BTÚ (strukturelt BTÚ)*, ið er óávirkað av konjunkturum, men einans hevur í sær íkast frá arbeiðsproduktivitetsvøkstri og arbeiðsvirknisvøkstri. Saman við útrokning Fíggjarmálaráðsins av ikki-konjunkturtreytaðum BTÚ, tvs. *strukturellum BTÚ*, fer Fíggjarmálaráðið væntandi eisini at kunna útrokna *strukturelt arbeiðsloysi* (ikki-konjunkturtreytað arbeiðsloysi) og *strukturelt arbeiðsvirkni* (ikki-konjunkturtreytað arbeiðsvirkni) og strukturellu saldoina (ikki-konjunkturtreytaðu saldoina) hjá almenna geiranum.

*Hesar umrøddu útrokningar Fíggjarmálaráðsins eru - sum nú er - á byrjunnarstigi. Búskaparráðið mælir til eina uppraðfesting av hesum útrokningunum, sum hava sum meginfortreyt uppgerð av BTÚ í føstum prísum.*

*Kapitul III gevur eina frágreiðing um kommunur*

Búskaparráðið hevur staðfest at útreiðsluvøksturin hjá kommununum seinastu árini hevur verið nógv størri enn útreiðsluvøksturin hjá landinum. Grundarlagið undir hesum staðfestingum er taltilfar frá Búskaparskipan landsins á Gjaldstovuni. Hesi viðurskifti gera tað neyðugt við nýggjari lóggávu um kommunalu búskaparstýringina, m.a. við tí endamáli at forða fyri konjunkturviðgangandi fíggjarpolitikki, og fyri at tryggja haldføri hjá almenna geiranum í longdini.

Landsbúskapurin verður stýrdur við játtanarkarmum (útreiðsluloftum), tó uttan nøktandi reglum um avleiðingar, tá farið verður út um játtanarkarmin. Við útlegging av eldrarøktini til kommunurnar vórðu stórar upphæddir fluttar frá landsins fíggjarstýring við játtanarkarmum (útreiðsluloftum), og til kommunala fíggjarstýring uttan játtanarkarmar ella útreiðsluloft.

Sum nevnt hevur konjunkturviðgangandi politikkur verið reglan og ikki undantakið í Føroyum. Í hesum viðfangi hevur verið ført fram frá kommunalari síðu, at kommunustýrislógin hevur sum undirskilta fortreyt, at kommunurnar hava skyldu til at nýta peningin, ið inn kemur í kommunukassarnar, til nýtslu og íløgur, og ikki at goyma hendan pening.

Hetta átti at givið landspolitikarunum høvi til at broyta lóggávuna soleiðis, at umframt kommunal útreiðsluloft (játtarnarkarmar) og hámarks og lágmarks kommunuskattaprosent fyri hvørja kommunu, verða ásettar reglur um kommunalar kassabindingar, og reglur fyri staðseting av árligum kommunalum roknskaparavlopum.

Var ein slík nýskipan gjørd við dagføring í kommunustýrislógini, kundi hetta eisini givið høvi til broyting í grein 54 í somu lóg um avmarking av støddini á nettoskuld kommununnar til eina nettoálíkning. Hetta mark kundi verið minkað til minni enn eina heila nettoálíkning. Ein slík herðing hevði verið forsvarlig, tá kommunurnar vórðu eggjaðar ella noyddar til at goyma roknskaparavlop frá "góðum tíðum" til seinni brúk.

Viðurskiftini í Føroyum eru smá, fólkatalsliga er landið alt ikki størri enn ein kommuna í grannalondunum. At nýta kommunur í grannalondunum og teirra málsøkjaábyrgdir sum fyridømi fyri føroysku kommunurnar er ikki hóskandi.

Eitt annað mál er spurningurin um kommunala útjavning. Eitt yvirskipað mál í tænastuveitingum kommunanna til borgararnar hevur verið at munurin í tænastustøðinum ikki fer upp um ella niður um ávíst mark, uttan mun til hvar í landinum og í hvørjari kommunu ein borgari býr. Við nógvu lítlu og støddarmunarstóru kommununum í Føroyum metir Búskaparráðið at vinningurin av eini kommunalari útjavningaskipan fyri allan kommunubúskapin eftir útlendskum leisti helst ikki hevði staðið mát við innsatsin. Munadyggasti og ómakaleysasti mátin til tess koma eitt sindur ávegis við størri kommunalari útjavning í Føroyum – eini útjavning ið fevnir um allan kommunubúskapin - er ivaleyst ein hóskandi samanlegging av kommunum, t.d. ein samanlegging í samsvari við eldrarøktar-økini.

# Kapitul I: Konjunkturmeting heystið 2016

# I 1 Inngangur um konjunkturmeting við høvuðstølum

Búskaparráðið og Hagstovan hava í felag mett um vøksturin í BTÚ í leypandi prísum frá 2014 til 2017. Í hesum sambandi hevur verið nýttur ein búskaparmyndil, sum er mentur í Landsbankanum og á Hagstovuni, og viðlíkahildin av Hagstovuni og Búskaparráðnum. Sum ílag (input) fyri myndlanýtsluni liggja tær metingar Búskaparráðsins og eisini Hagstovunnar av einstøku lutunum í búskapargongdini, sum greitt er frá seinni í hesi frágreiðing í teksti, talvum og myndum.

*Fyri árini 2015 og 2016* byggir myndilin millum annað á eina skipaða eftirviðgerð av lønartølunum frá Elektron og lønartølunum sambært virkisroknskapunum, og eisini á søguliga lutfallið millum restinntøkur og lønarinntøkur í bruttofaktorinntøkuni. Tá støddin av BTÚ í leypandi prísum er vorðin mett, verða eftirspurnar-/útreiðslupartarnir í BTÚ (nýtsla, íløga og nettoútflutningur) mettir sambært teimum indikatorum, sum Búskaparráðið og Hagstovan hava savnað við greiningum av taltilfari og samrøðum við persónar og stovnar, ið kunnu roknast at hava góðan varhuga av, hvat ið fyriferst í føroyska búskapinum.

*Fyri árið 2017* eru framskrivingarnar grundaðar á broytingar í eftirspurnar-/útreiðslupørtunum av BTÚ, og á samanhangir í eini input-output talvu. Almenn nýtsla og íløgur eru ásett samsvarandi almennum fíggjarætlanum og egnum metingum. Privat nýtsla og íløgur eru ásett sum lutføll í mun til ávíkavist tøka inntøku og samlað BTÚ. Nettoútflutningurin er ásettur í samsvari við gjørdar metingar. Sjálvsagt eru óvissur knýttar at slíkari meting av framtíðargongdini.

Umframt nýtslu av nevnda búskaparmyndli, sum greitt frá omanfyri, hevur konjunkturmetingin eisini við sær eina greining av dagførdu hagtølunum viðvíkjandi teimum mest týðandi tættunum í búskapargongdini.

Innihaldið á komandi síðum er ein samanfating av hesum greiningum og metingum av vinnuligu og samfelagsbúskaparligu gongdini, og samanfatingin fevnir um innlendskan og útlendskan eftirspurning, herundir útflutning, og eisini innflutning, og um gongdina í privatu og almennu nýtsluni og íløgunum. Hugt verður eisini eftir struktuellu gongdini í vinnugeirunum (primær, sekundær og tertiærum vinnum) seinastu árini, gongdini í fólkatalinum, og eisini gongdini í laksaprísum og oljuprísum.

Hesar greiningar av konjunkturgongdini og strukturellu gongdini geva so íkøstini til eina heildarmeting av búskapargongdini, ið verður samanfatað sum metti vøksturin í BTÚ í leypandi prísum frá 2014 til 2017.

---

Gongdin í føroyska búskapinum seinastu árini hevur verið óvanlig, og trupult hevur tí verið at gjørt stuttsiktaðar forsagnir. Búskaparráðið hevur endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri árini 2016 og 2017 og metir nú serliga hendan vøksturin í 2016 og 2017 at verða hægri enn mett í frágreiðing ráðsins frá í vár.

**Tekstkassi 1:**
**Skipan av konjunkturfrágreiðingini í avsnitt**
Konjunkturfrágreiðingin er skipað í avsnitt eftir eftirspurnar- ella útreiðslupørtunum av BTÚ. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur frá tveimum síðum: frá innlandi sum eftirspurningur til nýtslu og íløgur[1], og frá útlandi sum eftirspurningur eftir útflutningi. Innflutningurin er partur av innlendis eftirspurnar pørtunum og fevnir eisini um nýtslutilfar í framleiðsluni. Innflutningurin trektur frá útflutninginum gevur nettoútflutningin. Bruttotjóðarúrtøkan er sostatt samansett av hesum eftirspurnarpørtum: privatari nýtslu plus privatum íløgunum plus almennari nýtslu plus almennum íløgum plus útflutninginum minus innflutningin.

[1] Munurin millum íløgur og nýtslu er at íløgur sum meginreglu hava eina livitíð uppá meira enn 1 ár.

Talva I 1 niðanfyri vísir BTÚ býtt á útreiðslupartar í leypandi prísum í 2013, og talvan vísir eisini mettu vakstrar-ískoytini til BTÚ-vøksturin í ársins prísum (leypandi prísum)[2] árini 2014-2017.

Talva I 1 vísir at fyri árið 2014 stavar vøksturin uppá 5,8% í BTÚ í leypandi prísum frá eftirspurningi úr útlondum (nettoútflutninginum), og sostatt ikki frá innlendis eftirspurninginum. Gongdin í almennu og privatu íløgunum og nýtsluni kann tí ikki forklára vøksturin hetta árið.

Fyri árið 2015 verður roknað við einum vøkstri í BTÚ uppá 6,2% í ársins prísum. Hesin vøkstur stavar í størri mun frá innlendis enn útlendskum eftirspurningi.

Fyri árið 2016 verður roknað við einum vøkstri í BTÚ uppá 8.5% í ársins prísum. Væntandi stavar hesin vøkstur bæði frá innlendis og útlendskum eftirspurningi.

Fyri árið 2017 er vøksturin í BTÚ í leypandi prísum mettur til 4,1%, ið væntandi bara stavar frá innlendskum eftirspurningi, og togar útlendski eftirspurningurin (nettoútflutningurin) BTÚ-vøksturin niðureftir.

**Talva I 1 BTÚ býtt á eftirspurnar-/útreiðslupartar í leypandi prísum í mió. kr. 2013 og %-vísa árliga vakstrarískoytið til BTÚ-vøksturin árini 2014-2017[3]**

| | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|
| Privat nýtsla | 7.626 | 2,7% | 3,0% | 3,0% | 2,5% |
| Almenn nýtsla | 4.350 | 0,1% | 0,4% | 1,0% | 0,6% |
| Privatar íløgur | 2.504 | -2,7% | 3,0% | 2,3% | -0,3% |
| *herav innlendis framl.* | 1.532 | 1,2% | 1,7% | 1,0% | 1,5% |
| Goymslubroytingar | 119 | -0,6% | -3,1% | -2,9% | 1,2% |
| Almennar íløgur | 1.031 | -0,1% | 0,6% | 1,4% | 1,1% |
| Allar íløgur uttan goymslubroytingar | 3.534 | -2,9% | 3,6% | 3,8% | 0,8% |
| Innlendskur eftirspurningur | 15.629 | -0,8% | 4,0% | 4,9% | 5,1% |
| Útflutningur íalt | 7.433 | 4,2% | 4,2% | 6,7% | -0,5% |
| *Vørur* | *6.272* | 1,8% | 3,1% | 5,6% | -0,5% |
| *Tænastur* | *1.161* | 2,4% | 1,1% | 1,1% | 0,0% |
| Eftirspurningur tilsamans (uttan innflutning) | 23.062 | 3,4% | 8,2% | 11,7% | 4,5% |
| Innflutningur íalt | 8.384 | -2,4% | 1,9% | 3,2% | 0,4% |
| *Vørur* | *6.160* | -2,2% | 0,5% | 1,7% | 0,4% |
| *Tænastur* | *2.224* | -0,2% | 1,4% | 1,5% | 0,0% |
| Nettoútflutningur (útlendskur eftirspurn.) | -951 | 6,6% | 2,3% | 3,5% | -0,9% |
| **BTÚ (innlendis eftirsp. – netto útflutningur)** | **14.678** | **5,8%** | **6,2%** | **8,5%** | **4,1%** |

Kelda: Hagstovan, 2014-2017 eru mett. Viðmerking: 'herav innlendis íløgur' vil siga íløgur uttan útlendskt bygd skip og flogfør.

Frágreiðingar um útrokningarhátt fyri vakstraríkoyti eru at finna í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum á vári 2016 á síðu 11.

Talva I 2 vísir gongdina í teimum einstøku eftirspurnar pørtunum í prosent av BTÚ árini 2013-2017. Vit síggja at almenna og privata nýtslan er støðug og umleið 80% av BTÚ hesi árini. Innlendis framleiddar íløgur verða mettar at vera vaksandi í tíðarskeiðinum 2013-2017. Eisini sæst at innflutningurin minkar sum prosent av BTÚ serliga frá 2013 til 2014.

[2] Búskaparvøksturin (BTÚ-vøksturin) verður í Føroyum uppgivin í ársins prísum (leypandi prísum) av tí at BTÚ í Føroyum ikki verður uppgjørt í føstum prísum. BTÚ-vøksturin aðrastaðni verður roknaður av BTÚ-uppgerðum í føstum prísum. Føroysku vakstrartølini kunnu tí ikki sammetast við útlendsk vakstrartøl.

[3] Nýggjasta BTÚ uppgerðin er frá 2013. BTÚ tølini frá 2014-2017 byggja á metingar.

**Talva I 2 BTÚ býtt á eftirspurnar-/útreiðslupartar í % av BTÚ árini 2013-17 (leypandi prísir)**

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Privat nýtsla | 52,0% | 51,6% | 51,3% | 50,1% | 50,5% |
| Almenn nýtsla | 29,7% | 28,1% | 26,9% | 25,7% | 25,3% |
| Privatar íløgur | 17,1% | 13,5% | 15,6% | 16,5% | 15,6% |
| *herav innlendis framl.* | 10,4% | 11,0% | 12,0% | 12,0% | 13,0% |
| Goymslubroytingar | 0,3% | -0,3% | -3,2% | -5,6% | -4,3% |
| Almennar íløgur | 7,0% | 6,5% | 6,7% | 7,5% | 8,2% |
| Allar íløgur uttan goymslubroytingar | 24,1% | 20,1% | 22,3% | 24,0% | 23,8% |
| Innlendskur eftirspurningur | 106,0% | 99,4% | 97,3% | 94,3% | 95,4% |
| Útflutningur íalt | 50,8% | 51,9% | 52,8% | 54,9% | 52,2% |
| *Vørur* | 41,6% | 40,9% | 41,5% | 43,4% | 41,2% |
| *Tænastur* | 9,2% | 10,9% | 11,3% | 11,5% | 11,0% |
| Eftirspurningur tilsamans (uttan innflutning) | 156,8% | 151,3% | 150,1% | 149,2% | 147,6% |
| Innflutningur íalt | 56,8% | 51,3% | 50,1% | 49,2% | 47,6% |
| *Vørur* | 41,3% | 36,9% | 35,2% | 34,0% | 33,0% |
| *Tænastur* | 15,5% | 14,4% | 15,0% | 15,2% | 14,6% |
| Nettoútflutningur (útlendskur eftirspurn.) | -6,0% | 0,6% | 2,7% | 5,7% | 4,6% |
| **BTÚ (innlendis eftirsp. – netto útflutningur)** | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% |

Kelda: Hagstovan, 2014-2017 eru mett. Viðmerking: 'herav innlendis íløgur' vil siga íløgur uttan útlendskt bygd skip og flogfør.

Mynd I 1 niðanfyri vísir vøksturin í BTÚ í leypandi prísum deilt á innlendis og útlendskan eftirspurning. Vit síggja at BTÚ-vøksturin í leypandi prísum í 2013 bert stavaði frá útlendskum eftirspurningi, meðan allur metti vøksturin í 2017 stavar frá innlendskum eftirspurningi. Vit síggja eisini at árini 2005 til 2007 var allur BTÚ-vøksturin í leypandi prísum drivin fram av innlendskum eftirspurningi – har lánifígging av vøkstrinum hevði sín leiklut. Fyri 2012 stavaði allur BTÚ-vøksturin í leypandi prísum frá innlendis eftirspurningi meðan útlendskur eftirspurningur trekti BTÚ-vøksturin í leypandi prísum nógv niðureftir; hetta árið var nevniliga stórur innflutningur av skipum og flogførum, og hesin skeiklar myndina.

Síðan 2010 hevur føroyski búskapurin í leypandi prísum verið í stórum vøkstri aftaná negativan vøkstur 2008 til 2009.

**BTÚ vøkstur í leypandi prísum býtt á innlendis og útlendis eftirspurning, 1999-2017** **Mynd I 1**




**Kelda:** Hagstovan, 2014-2017 er framroknað við búskaparmyndli hagstovunnar

Hagstovan ger ikki tjóðarroknskapin upp í føstum prísum. Givið er tó at stórur partur av BTÚ-vøkstrinum í ársins prísum seinastu árini stavar frá prísbroytingum á útlendskum marknaðum, og at vøksturin í BTÚ í *føstum prísum* (realvøksturin í BTÚ) vildi verið nógv lægri enn roknaði BTÚ-vøksturin í leypandi prísum. Stórur prísvøkstur hevur til dømis verið á útfluttum laksi síðan 2013, og príslækking hevur verið á olju. Hetta hevur borið við sær eina fyri Føroyar fyrimunarliga betring av býtislutfallinum í uttanlandshandlinum. Øvugt hevur gongdin í makrelfiskiskapinum verið at nøgdirnar eru øktar tey seinnu árini, meðan prísirnir eru nøkulunda støðugir.

Um roknað varð í føstum prísum vildu einans broytingar í nýttu oljunøgdunum og broytingar í útfluttu laksa- og makrelnøgdunum talt við í fastprís-uppgerðini. Fyri 2013 stavaði til dømis nærum helvtin av BTÚ-vøkstrinum uppá 7,5% frá alivinnuni, og hesin vøkstur stavaði aftur frá príshækkingum í útflutninginum av alifiski (og ikki frá tøkunøgdini, sum fall).

**Tekstkassi 2:**
**Uppgerð av BTÚ í leypandi prísum og ikki í føstum prísum**
Í Føroyum gera vit bert BTÚ upp í leypandi prísum. Hetta merkir at vit í Føroyum ikki kenna búskaparvøksturin, sum er árligi vøksturin í BTÚ í føstum prísum. Útrokningin í føstum prísum vísir reala (nøgdarliga) búskaparvøksturin. Hesin gevur ábendingar um produktivitetsvøksturin í búskapinum. Vit noyðast tí at halda okkum til BTÚ í leypandi prísum, tá vit (í Kapitul I í búskaparráðsfrágreiðingini) skulu meta um framtíðar búskapargongdina í tí *stutta siktinum.* At meta um framtíðar gongdina í BTÚ í leypandi prísum er sera trupult, og talið fyri vøksturin í BTÚ í leypandi prísum hevur eitt avmarkað nýtsluvirði. Prísgongdir í uttanlandshandlinum (innflytningi og útflutningi) hava seinnu árini stórliga ávirkað uppgjørda BTÚ-ið í leypandi prísum. At gera metingar av framtíðar prísgongdum í m.a. uttanlandshandlinum er sera trupult, og hetta ger eisini metingina av BTÚ-vøkstrinum í leypandi prísum meira óvissa. At gjørt meting av BTÚ-vøkstrinum í føstum prísum hevði gjørt tað møguligt at mett um trendin í búskapargongini í langa siktinum og sveiggini rundan um hendan trend í stutta siktinum. Ein slík uppgerð hevði eisini minkað um óvissuna í metingunum, tí vit tá kundu sæð burtur frá væntaðum prísbroytingum í m.a. uttanlandshandlinum.

## I 1.1 Eftirspurningurin

Mynd I 2 vísir gongdina í innlendis eftirspurnarpørtunum (nýtsluni og íløgunum) síðan 1998, og mynd I 3 vísir gongdina í útflutningi, innflutningi, nettoútflutningi, BTÚ og brúkaraprístalinum. Øll tølini í báðum myndunum eru víst sum vísitøl við 1998 sum grundári.

Mynd I 2 vísir at almenna nýtslan hevur verið tann mest støðugi parturin av innlendis eftirspurninginum, og næst eftir henni í støðufesti er privata nýtslan. Hinvegin eru privatu og almennu íløgurnar tann mest sveiggjandi parturin av innlendis eftirspurninginum. Mynd I 2 vísir fyri almennu íløgurnar ein stóran vøkstur fram til 2008, har tað síðani hendi ein stór minking í almennu íløgunum.

Almennu íløgurnar hava sostatt verið konjunkturviðgangandi, og hevur almenni geirin tískil økt um sveiggini í búskapargongdini. Í næst seinastu frágreiðing frá heystið 2015 varð í kapittul II hugt at íløguætlanum hjá almenna geiranum, og meting varð gjørd av, um søgan við konjunkturviðgangandi almennum íløgum kann fara at endurtaka seg í komandi árum. *Búskaparráðið roknar tað sum óheppið at almenna íløgugongdin í so stóran mun er konjunkturviðgangandi.*

Privatu íløgurnar hava eisini verið sveiggjandi, men ein stórur partur av hesum íløgunum hevur verið innflutningur av útlendskt bygdum skipum, flogførum og vindmyllum. Íløgur av hesum slagnum leggja ikki stórt eftirspurnartrýst á føroyska arbeiðsmarknaðin.

**Gongdin í innlendis eftirspurnar pørtum 1998-2017, indeks 1998=100** **Mynd I 2**




**Kelda:** Hagstovan og Búskaparráðið

Mynd I 3 vísir gongdina í útlendskum eftirspurningi, og í BTÚ og brúkaraprístali. Útflutningurin, innflutningurin og BTÚ eru í leypandi prísum vaksin stórliga seinnu árini. Mynd I 3 bendir eisini á at ein realvøkstur er hendur í BTÚ; støddina á hesum realvøkstri kenna vit ikki, tí føroyska BTÚ-ið verður sum áður nevnt ikki gjørt upp í føstum prísum. Brúkaraprístalið er langt frá vaksið tilsvarandi við hinum støddunum.

Privatar íløgur í skip, flogfør og vindmyllur síggjast aftur í innflutningstølunum í mynd I 3 sum stór sveiggj í innflutningi, og samsvara hesi sveiggj við sveiggini í privatu íløgunum í mynd I 2. Tá BTÚ verður gjørt upp, verður innflutningurin trektur frá útflutninginum, soleiðis at vit finna talið fyri nettoútflutningin.

Annars hevur nettoútflutningur av vørum og tænastum (høgri aksi) verið negativur burtursæð frá árunum 1998 og 2014 til 2017. Øll hini árini síðan 1998 hevur hesin nettoútflutningur Føroya verið negativur. Orsøkin til at hetta ber til, er heildarveitingin úr Danmark og lønarinntøkur úr útlondum, sum medvirka til at geva eitt yvirskot á gjaldsjavnanum. Samstundis ger heildarveitingin at almenna nýtslan í % av BTÚ vanliga er størri enn í londunum vit vanliga sammeta okkum við. Eisini gera lønarinntøkurnar úr útlondum at privata nýtslan í % av BTÚ vanliga er størri enn í londunum vit vanliga samanbera okkum við[4].

**Útlendskur eftirspurningur, BTÚ og brúkaraprístali 1998-2017, indeks 1998=100** **Mynd I 3**




**Kelda:** Hagstovan og Búskaparráðið

[4] Sí búskaparráðið, búskaparfrágreiðing heysti 2013 á síðu 41.

Søguliga hava stórar niðurgongdir í føroyska búskapinum ofta stavað frá stórum føllum í útflutninginum (útlendskum eftirspurningi), og hava hesi føll ávirkað úrslitini hjá almenna geiranum og eisini inntøkurnar í útflutningsvinnum, sum aftur ávirka arbeiðsvirknið og inntøkur í teimum vinnum, ið framleiða til innlendskan eftirspurning. Henda 'regla' er tó ikki uttan undantak. Undir kreppuni síðst í 80unum og byrjanini av 90unum, skapti privat og alment íløguvirksemi og lániveitingar óheft av útflutninginum stór sveiggj í búskapargongdini. Seinni í tilgongdini minkaði útflutningurin eisini stórliga. Aftur undan fíggjarkreppuni árini 2007-2009 var tað innlendis eftirspurningurin sum vaks (sí mynd I 1). Privata nýtslan sum partur av BTÚ hevur verið støðug síðan kreppuna í 80unum og byrjanina av 90unum, men fall nógv árini 2007-2009. Vegna støddina á privatu nýtsluni í mun til BTÚ virkar eitt sovorðið fall ógvusligt á búskapin. Eisini almennu íløgurnar minkaðu stórliga í 2007-2009, og hevði hetta eisini negativa ávirkan á búskapargongdina.

## I 1.2 Haldførið og tað langa siktið

Frammanfyri standandi viðmerkingar snúgva seg um tey hagtøl, ið lýsa stutttíðargongdina í búskapinum. Hesi hagtøl geva eina ávísa grund til bjartskygni um gongdina í tí stutta siktinum.

Sum nevnt í undanfarnum frágreiðingum eru tað onnur tøl sum lýsa langtíðargongdina í búskapinum. Ein greining av hesum hagtølum varð gjørd í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum frá vári 2015, og var niðurstøðan at føroyski búskapurin ikki var haldførur uppá longri sikt. Tað vil siga at almennu útreiðslurnar í longdini vegna gongdina í fólkatalinum og fólkatalssamansetingini fara at vaksa meira enn almennu inntøkurnar. Tilmælið frá Búskaparráðnum hevur tískil verið, at hitt almenna beinanvegin eigur at fara í gongd við nýskipanir og vinnupolitisk tiltøk, ið stiðja upp undir eina konsolidering av tí almenna búskapinum. Tey tiltøk, sum landstýrið hevur gjørt í seinastuni, hava ikki havt stórvegis ávirkan á fíggjarliga haldførið. Til dømis hevur flyting av pensjónsútreiðslum frá landi til AMEG ikki nakra ávirkan á haldførið hjá almenna geiranum; hetta er bara ein flyting innan almenna geiran.

Tølini, sum lýsa langtíðargongdina í búskapinum, broytast ikki so nógv árliga (í stutta siktinum), men broytingarnar eru støðugar og stórar yvir eitt longri áramál (í tí langa siktinum). Vegna lutfalsligu lítlu árligu broytingarnar kann tað vera freistandi at síggja burtur frá hesum tølum, men eigur hetta ikki at verða undirmett.

Í Føroyum eru vit í stóran mun ávirkaði av demografisku broytingunum. Hesi viðurskifti verða eitt sindur meiri umrødd í kapitul II.

## I 1.3 Bústaðarmarknaðurin

Mynd I 4 vísir gongdina í húsaprísum og brúkaraprísum sum skrásett av Eik banka. Hagtølini geva tó ikki eina heilt neyva mynd av prísgongdini. Íbúðir eru til dømis ikki við hagtølunum, og bert hús við grundøkjum millum 250 og 1000 fermetrar eru tald við.

**Gongdin í húsaprísum og brúkaraprístalinum 1998-2015** **Mynd I 4**




**Kelda:** Hagstovan og Eik

Mynd I 4 vísir at eitt slag av bløðru varð blást upp fram til 2007, og sum brast fram til 2009. 'Bløðran' vísti seg serstakliga í húsaprísum í Tórshavnar kommunu, men var tó ikki so stór sum í t.d. Danmark. Prísirnir á húsum í Tórshavn hava verið vaksandi síðan 2012, og eru nú á næstan sama støði sum í 2007. Munurin millum húsaprísir í Tórshavn og aðrastaðni í Føroyum vaks sera nógv í 2006, og hevur munurin uppá eina góða millión krónur hildið sær síðan tá. Prísurin á íbúðum er vaksin nógv meira enn prísurin á sethúsum, og eru hesir íbúðarprísir ikki við í hagtølunum í mynd I 4. Prísvøksturin er grundaður á lægri rentu og størri eftirspurningi, serliga eftir íbúðum í Tórshavnar økinum. Vandi er fyri at ein fokusering uppá stutta siktið við einum konjunktur-viðgangandi almennum íløgupolitikki kann leiða til hækkandi prísir á fastognarmarknaðinum í høvuðsstaðarøkinum komandi árini.

## I 1.4 Vinnuviðkomandi bygnaðarbroytingar

Samstundis sum fíggjarkreppan hevur havt sína ávirkan á búskapargongdina í Føroyum, eru stórar bygnaðarligar broytingar farnar fram í føroyska búskapinum. Eitt er at fólkasamansetingin er broytt; annað er at vinnugreinabýtið er broytt, og at útflutningsmynstur og marknaðarlond Føroya eisini eru broytt.

Mynd I 5 vísir gongdina í virðisøkingini býtt á tilfeingis-, framleiðslu- og tænastuvinnur. Hendan vísta gongdin hevur verið eitt sindur øðrvísi enn í grannalondunum har tertiæru vinnunar eru vaksnar, og har tilfeingisvinnurnar eru minkaðar, og somuleiðis framleiðsluvinnurnar. Í Føroyum hava síðan 2009 serliga tilfeingisvinnurnar (primæru vinnurnar, tvs. serliga uppisjóvar fiskivinnan og alivinnan) vaksið lutfalslig nógv, meðan tænastuvinnurnar (tertiæru vinnurnar) hava lutfalsliga stagnerað og minkað, og sama er galdandi fyri framleiðsluvinnurnar (sekundæru vinnurnar).

Ein orsøk til hesa gongdina er gongdin í alivinnuni og uppisjógvarvinnuni, og harvið í útlendska eftirspurninginum, sum sostatt í stóran mun hevur borið fram vøksturin í búskapinum seinastu árini (2011 og 2012 undantikið). Spurt kann verða um hendan gongdin kann halda fram, og hvønn týdning tað hevur, at tertiærvinnan ikki lutfalsliga veksur eins og teimum londum vit vanliga samanmeta okkum við. Hetta kann eisini hava týdning fyri tilflytingina til Føroya; flestu møguligu tilflytarar til Føroya við útbúgving frá útlondum leita helst eftir arbeiði innan tertiæru vinnuna.

**%-býti av virðisøkingini býtt á tilfeingis-, framleiðslu- og tænastuvinnur 1998-2013 Mynd I 5**




**Kelda:** Hagstovan

Virðisøkingini býtt á tilfeingis-, framleiðslu- og tænastuvinnur í mió. kr. eru víst í mynd I 6 niðanfyri. Myndin vísir at ein stórur vøkstur í veruligum tølum í leypandi prísum hevur verið í tænastuvinnum (tertiærum vinnum) síðan fíggjarkreppuna, men tilsvarandi vøksturin innan tilfeingisvinnuna (primæru vinnuna) hevur verið uppaftur størri. Framleiðsluvinnan (sekundæra vinnan) hevur hinvegin minkað í lutfalsligum virði, og stagnerað í veruligu tølum.

**Virðisøking býtt á tilfeingis-, framleiðslu- og tænastuvinnur í mió. kr. 1998-2013 Mynd I 6**




**Kelda:** Hagstovan

Mynd I 7 niðanfyri vísir gongdina í *virkisyvirskoti* og *lønum í vinnufyritøkum*[5], (bæði í mió. kr.). Eisini er roknað lutfallið millum virkisyvirskot og lønir.

[5] Hetta er allar lønir uttan lønir í almennari fyrisiting og í fíggjarfyritøkum

**Yvirskot og lønir fyri vinnufyritøkur í mió. kr. 1998-2013** **Mynd I 7**




**Kelda:** Hagstovan

Vit síggja at lønirnar í vinnufyritøkum í mió.kr. vuksu nógv fram til fíggjarkreppuna í 2007-08, harnæst fullu tær, og vóru tær í 2013 einans góðar 100 mió. kr. størri enn í 2008. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 2,3%, ið umboðar eitt fall í realum virði av lønunum.

Yvirskot í vinnufyritøkum var stagnerandi frá 1998 fram til 2008, men er vaksið stórliga síðan 2008. Talan er um meira enn eina tvífalding í virkisyvirskoti, frá 1389 mió. kr. til 2948 mió. kr., ella ein vøkstur uppá 112%.

Lufallið millum virkisyvirskot og lønir er vaksið frá 30,3% í 2008 til 62,8% í 2013. Orsøkin til hesa lutfalsligu stóru broyting síðan 2008 eru stóru vinningarnir í uppisjóvarvinnuni og alivinnuni seinastu árini, sum ikki eru komnar løntakarunum í allari vinnuni til góðar, men hinvegin kapitalánarunum. Talan er í stuttum um stóru avlopini, sum í størri mun eru fallin kapitalánarunum í lut (serliga í alivinnuni), og ikki løntakarunum, og heldur ikki náttúrukapitalinum sum føroyska felagsogn ella lunnindi.

Mynd I 8 vísir talið av løntakarum og roknaða løn pr. løntakara í vinnufyritøkum[6] frá januar 1998 til oktober 2015. Kurvarnar í mynd I 8 eru bygdar á útrokningar av leypandi 12 mánaðar miðal, sí tekstkassa 3 undir avsnitti I 3.1.

**Løntakarar og løn pr. løntakara í vinnufyritøkum í mió. kr. jan-98 til apr-16** **Mynd I 8**




**Kelda:** Hagstovan

6 Hetta er allir løntakarar uttan løntakarar í almennari fyrisiting og í fíggjarfyritøkum

Mynd I 8 vísir at stórar broytingar hava verið í *løntakaratalinum* í vinnufyritøkum í tíðarskeiðinum 1998 til 2015. Ein stórur vøkstur var fram til 2004, eitt lítið fall hendi í 2005, og so aftur ein vøkstur í 2007-08, og síðan eitt fall fram til januar 2012. Aftaná januar 2012 hevur aftur ein vøkstur verið í løntakaratalinum í vinnufyritøkum. Hesin seinni vøksturin sýnist at vera serliga stórur frá miðjum 2014.

*Roknað løn pr. løntakara* í vinnufyritøkum er vaksin síðani 1998. Kurvan í mynd I 8 vísir nøkur sveiggj, ið hanga saman við konjunkturgongdini. Mynd I 8 bendir á at reallønir og produktivitetur í vinnufyritøkunum eru vaksin í tíðarskeiðinum síðan 1998.

Mynd I 7 vísti at samlaðu lønargjaldingarnar í vinnufyritøkum stóðu nærum í stað frá 2008 til 2013. Hinvegin vísir mynd I 8 at roknað løn pr. løntakara í vinnufyritøkum er vaksin nógv í tíðarskeiðinum síðan 2008, og kanska serliga nógv síðan 2013. Vísandi til mynd I 7 er tað sostatt ikki tann einstaki løntakarin, ið hevur fingið minni í løn, men er talið av løntakarum í vinnufyritøkum nógv minkað fram til 2013, sí mynd I 8. Tí verður meira løn til hvønn, tá miðaltalið verður roknað.

---

Gongdin í fólkatalinum og nettotilflytingini eru týðandi indikatorar fyri búskapargongdina og vinnuligu gongdina í Føroyum, bæði í tí langa og stutta siktinum.

Mynd I 9 niðanfyri vísir sambandið millum nettotilflyting og arbeiðsloysi frá januar 1998 til mai 2016 (arbeiðsloysi er tó bert dagført fram til november 2015). Tølini fyri nettotilflyting byggja á leypandi 12 mánaðar samanlegging, sum vísir trendin í gongdini. Myndin vísir at nettofráflytingin sum heild hevur verið rættiliga stór í tíðarskeiðinum. Trý tíðarskeið hava verið við positivari nettotilflyting, nevniliga árini 1998-2004, 2009 og 2014-2016. Nettotilflytingin í seinastuni hevur uttan iva samband við vaksandi tal av størvum í Føroyum. Størri arbeiðsloysi í Føroyum sýnist at minka um nettotilflytingina og øvugt, tó at uttan at hetta samband forklárar alla gongdina í tølunum. Seinastu tølini benda á at vøksturin í nettotilflyting heldur áfram.

**Arbeiðsloysið (%) og nettotilflyting leypandi 12 mðr samanlegging jan-98 til mai-16 Mynd I 9**




**Kelda:** Hagstovan

Mynd I 10 niðanfyri vísir gongdina í fólkatalinum sum leypandi miðal, og í nettotilflytingini sum leypandi samanlegging. Vit síggja, at fólkatalið mestsum hevur staðið í stað frá 2004 til 2014. Í 2014 var fyri fyrstu ferð síðani 2009 vøkstur í fólkatalinum. Burðaravlopið (munurin millum føðital og deyðatal) hevur verið fallandi seinastu 25 árini, og við núverandi deyðs- og føðitíttleika verður burðaravlopið negativt longu í 2035[7].

[7] Egnar útrokningar við støði í aldurstreytaðum føði- og deyðstíttleika í 2014 og seinastu fólkatalsframskriving Hagstovunar.

**Fólkatalið og nettotilflyting leypandi 12 mð miðal og samanlegging jan-98 til mai-16 Mynd I 10**




**Kelda:** Hagstovan

## I 1.5 Laksa- og oljuprísir

Laksaprísir og oljuprísir ávirka sum sagt føroyska búskapin stórliga í leypandi prísum.

Mynd I 11 vísir gongdina í oljuprísinum[8] í donskum krónum síðan januar 2014. Vit síggja at oljuprísurin hevur sveiggjað rættiliga nógv, og fyribils liggur hann á umleið 200 DKK/tunnu (miðal í 2015 327 DKK/tunnu), har hann í 2014 lá á umleið 500 DKK/tunnu (miðal fyri 2014 var 522 DKK/tunnuna). Av tí at olja verður handlað í dollarum, og dollarkursurin er hækkaður umleið 25% frá juli 2014 til juli 2015, so merkist oljuprísfallið á heimsmarknaðinum ikki so væl – góð helvt av oljuprísfallinum er í hesum tíðarskeiðið neutraliserað vegna hækking í dollarkursinum. Síðan juli 2015 og til í dag hava bæði oljuprísir og dollarkursir verið nøkulunda støðugir.

**Spotprísir av olju (DKK/tunnu), jan-14 til aug-16 Mynd I 11**




**Kelda:** Thomson/Reuters og Danski tjóðbankin

Mynd I 12 vísir gongdina í laksaprísunum í norskum krónum seinastu árini. Vit síggja at sveiggini eru stór, men at trendurin vísir ein prísvøkstur seinastu nógvu árini. Prísurin er í hæddini, og hevur ikki verið hægri seinastu nógvu árini. Viðmerkjast skal, at norska krónan er fallin útvið 20% síðan hon toppaði í 2012, og tí hevur vøksturin í laksaprísinum ikki verið so stórur í donskum krónum. Hinvegin er

[8] Hetta er WTI (West Texas Intermediate) oljan, sum vanliga er undir norðsjóvarolju (Brent) prísinum.

dollarkursurin sum nevnt styrknaður við útvið 25% síðan miðan 2014, og tí er útflutningsprísurin fyri laks til USA í donskum krónum vaksin meira enn víst á myndunum.

**Spotprísir av laksi í norskum krónum hvørja viku, jan-11 til aug-16** **Mynd I 12**




**Kelda:** fishpool.eu

Mynd I 13 vísir *broytingina* í laksaprísunum í miðal fyri hvørja viku í árinum. Í 2015 var ein prísvøkstur á 5%. Í 2016 higartil er prísvøksturin heili 55% í mun til sama tíðarskeið í 2015.

**Árlig prosent broyting í spotprísinum á laksi 2005-2016** **Mynd I 13**




**Kelda:** fishpool.eu, 2016 er higartil í ár

Gongdin í oljuprísunum í 2014 og 2016, og gongdin í laksaprísinum í 2013 til 2016, hava betrað um býtislutfallið í uttanlandshandlinum, sum alt annað líka hevur betrað handilsjavnan. Tað vil siga at vit fáa lutfalsliga meira fyri okkara laksaútflutning, samstundis sum vit fáa ein lutfalsliga bíligari oljuinnflutning.

## I 1.6 Handilsjavnin

Talva I 3 vísir gongdina í vøruútflutningi og vøruinnflutningi fyrra hálvár 2016 sammett við fyrra hálvár 2015. Innflutningstølini vísa vaksandi innflutningsvirði í mun til sama hálvár í 2015 (14% íalt). Hinvegin, um skip verða roknaði frá, var tann tilsvarandi vøksturin í innflutninginum 7%.

Innflutningurin til beinleiðis nýtslu er vaksin við 5%. Sami vøkstur er eisini í innflutninginum av bilum til vinnu og privata nýtslu (5%). Hetta kann vera ein ábending um ein vøkstur í privatu nýtsluni.

Innflutt tilfar til byggivirksemi er eisini vaksið (8%) og er innflutningurin av maskinum og aðrari útgerð vaksin við 75%, og gevur hetta ábending um ein vøkstur í íløguvirkseminum. Hinvegin er innflutningurin av brennievni fallin við 30%.

Útflutningurin er vaksin 19% í fyrra hálvári 2016 í mun til fyrra hálvár 2015. Vøkstur hevur verið í *"uppisjóvarfiski" og "alifiski"* uppá ávikavist 14% og 38%, meðan útflutningurin av *"botnfiski og øðrum fiskasløgum"* er minkaður við 15%.

Handilsjavnin er batnaður seinastu árini serliga um skip ikki verða tikin við, og stavar hetta partvís frá betringini í býtislutfallinum í uttanlandshandlinum.

**Talva I 3 Innflutningur og útflutningur av vørum og handilsjavnin fyrra hálvár 2016**

| | Innflutningurin cif fyrra hálvár 2016 | Støddarlutfall | Hálvárligur vøkstur |
|---|---|---|---|
| Til hav- og landbúnað | 177 | 7% | 18% |
| Til byggivirki | 291 | 11% | 8% |
| Til aðra framleiðslu | 666 | 25% | 5% |
| Brennievni ot. | 316 | 12% | -30% |
| Maskinur oo. útgerð | 457 | 17% | 75% |
| Bilar oo. flutningsfør | 202 | 8% | 5% |
| Til beinleiðis nýtslu | 671 | 25% | 5% |
| Skip, flogfør ot. | 209 | 8% | - |
| Rávøra til fiskavirking | 94 | 4% | 19% |
| Vøruinnflutningur íalt | 3.082 | 100% | 14% |
| Vøruinnflutningur ex. skip oa. | 2.873 | 99% | 7% |

| | Útflutningurin fob fyrra hálvár 2016 | Støddarlutfall | Hálvárligur vøkstur |
|---|---|---|---|
| Alifiskur | 1.676 | 46% | 38% |
| Uppsjóvarfiskur | 695 | 19% | 14% |
| Botnfiskur og onnur fiskasløg | 986 | 27% | -15% |
| Skip og aðrar vørur | 237 | 6% | - |
| Íalt | 3.673 | 100% | 19% |

| | 2016 fyrra hálvár | 2015 alt árið | 2014 alt árið | 2013 alt árið |
|---|---|---|---|---|
| Handilsjavnin (vøruútflutningurin – vøruinnflutningurin uttan skip ol.) | 591 | 1141 | 717 | 535 |
| Handilsjavnin (vøruútflutningurin – vøruinnflutningurin við skip ol.) | 563 | 701 | 506 | -186 |

Sí mynd I 36

# I 2 Innlendis eftirspurningur frá húsarhaldunum (privat nýtsla)

## I 2.1 Metingar viðvíkjandi privatu nýtsluni

Privata nýtslan er ein týdningarmikil partur av føroyska búskapinum; í støðd er privata nýtslan á hædd við útflutningin av vørum og tænastum. Tískil hevur gongdin í privatu nýtsluni stóra ávirkan á búskaparvøksturin í føstum prísum.

Privata nýtslan verður uppgjørd sum partur av uppgerðini av tjóðarroknskapinum. Seinastu uppgjørdu tjóðarroknskapartølini eru fyri 2013. Fyri tíðarskeiðið aftaná 2013 hava vit bert nakrar indikatorar um nýtsluna. Ein indikatorur er innflutningurin av nýtsluvørum (sí talvu I 3 á síðuni frammanfyri); aðrir indikatorar eru gongdin í lønargjaldinum (Sí mynd I 19a og 19b í avsnitti I 3), og MVG-inntøkur landskassans.

Mynd I 14 niðanfyri vísir nýtslukvotuna hjá húsarhaldunum sambært tjóðarroknskapartølum 1998 til 2017. Tølini fram til 2013 eru uppgjørd tøl, meðan tølini 2014-2017 eru bygt á metingar hjá Hagstovuni, grundaðar á modelavstemming, og á egnar metingar Búskaparráðsins.

Síðan 2007 er nýtslukvotan minkað rættiliga nógv. Hetta gevur ábending um at húsarhaldini aftaná fíggjarkreppuna hava víst stórt varsemi viðvíkjandi privatari nýtslu. Nakað tað sama er hent í okkara grannalondum[9].

Eitt ástøði er, at føroysku pensiónistaviðurskiftini (eldingin av búfjøldini, lutfalsliga lága pensións-uppsparingin og tvungna pensiónsnýskipanin) og royndirnar frá fíggjarkreppuni frá 2007-10 hava eggjað til sparing heldur enn privata nýtslu í Føroyum, og harvið til minni íkast frá innlendis eftirspurninginum til búskaparvøksturin. Nógvur privatur kapitalur er eisini mistur í samband við fíggjarkreppuna í nítiárunum og 2007-10 og roknast kann við at hetta eisini hevur eggjað til varsemi í privatari nýtslu. Lága rentustøðið og ivin um nøktand renting av pensiónsuppsparing kan eisini hava eggjað eldru ættarliðunum til sparing heldur enn nýtslu.

Tølini benda á, at tað ikki er tann privata nýtslan (húsarhaldini), sum hevur verið stóra drívmegin aftanfyri búskaparvøksturin seinastu árini fram til í dag. Fyri 2014 til 2017 er mett at nýtslukvotan veksur eitt sindur, og tí eisini privata nýtslan. Søguliga (1999-2008) hevur nýtslukvotan verið nógv hægri enn hon er í dag; ein størri ella minni nýtslukvota kundi fingið stóra ávirkan á búskapin, tí privata nýtslan sum nevnt er stórur partur av BTÚ.

**Nýtslukvota hjá húsarhaldum sambært tjóðarroknskapartølum 1998-2017** **Mynd I 14**




**Viðmerking:** Eftir 2013 eru tølini mett. **Kelda:** Hagstovan og Búskaparráðið

[9] Det økonomiske råd: Dansk økonomi forår 2015, síða 28-30.

Mynd I 15 niðanfyri vísir gongdina í innflutninginum av nýtsluvørum sum leypandi miðal. Stóri vøksturin seinastu tíðina í innflutninginum av hálvdrúgvum og drúgvum og ódrúgvum nýtsluvørum er nýtt sum grundgeving fyri at vit hava roknað við einari hækkaðari privatari nýtslukvotu í 2015-2017, hóast stagnering sæst í nýtsluni seinastu mánaðirnar.

**Lønarinntøka og innfluttar nýtsluvørur hjá húsarhaldum, jan-10 til jun-16** **Mynd I 15**




**Kelda:** Hagstovan

Mynd I 15 vísir, at innflutningurin av *hálvdrúgvum* nýtsluvørum (td. klæðum) og *drúgvum* nýtsluvørum (td. sjónvarp og bilum) síðan 2010 er vaksin, serliga aftaná miðjan 2012. Møguliga hevur skattalættin frá januar 2012 gjørt sína ávirkan galdandi, soleiðis at ráðini til keyp av hálvdrúgvum og drúgvum nýtsluvørum eru vorðin betri. Viðmerkjast skal eisini at lønarinntøkur vunnar í útlondum ikki er tiknar við í lønartølini sum víst í mynd I 15.

Innflutningurin av ódrúgvum nýtsluvørum (td. matur og drekka) og gongdin í lønargjaldingunum síðani 2013 vísa eina nøkulunda samanfallandi gongd fram til januar 2015. Síðan tá hevur gongdin verið tann, at innflutningurin av ódrúgvum nýtsluvørum er vaksin meira enn lønirnar. Tó sæst at gongdin í hesum innflutninginum aftur hevur verið samfallandi við gongdina í lønunum seinastu mánaðirnar. Í hagtølunum fyri innflutning fylla tær ódrúgvu nýtsluvørurnar meira enn tær drúgvu og hálvdrúgvu nýtsluvørurnar (60% ávikavist 40%).

## I 2.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum)

Treystitølini frá Hagstovuni í mynd I 16 niðanfyri snúgva seg um metingar frá húsarhaldunum um teirra fíggjarstøðu seinasta árið og komandi ár.

**Vísital - húsarhaldini og teirra fíggjarstøða, jan-06 til jun-16** **Mynd I 16**




**Kelda:** Hagstovan

Myndin vísir fram til januar 2015 eitt vaksandi bjartskygni, sum ikki hevur verið størri síðan januar 2007. Hinvegin hevur bjartskygnið verið eitt sindur minni síðan tá. Vit kenni ikki til nakað, sum kann forklára hesa minking í treystitalinum. Mynd I 17 niðanfyri vísir treysti-vísitalið tilsamans fyri føroysku húsarhaldini. Myndin vísir tað sama sum myndin omanfyri, nevniliga at treystitalið hjá húsarhaldunum í juni 2014 var størri enn nakrantíð, men at ein lítil minking síðan tá er hend, sum so er vend til ein lítlan vøkstur aftur í juni 2016. Vit kenna heldur ikki til nøkur viðurskifti, sum kunnu forklára hesa gongdina.

**Vísital - samlað brúkaravísital fyri føroysku húsarhaldini, jan-06 til jun-16** **Mynd I 17**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Mynd I 18 vísir gongdina í *privatu nýtsluni* sambært tjóðarroknskapinum árini 1999-2017. Tølini fyri 2014 til 2017 eru mett við nýtslu av búskaparmyndli Hagstovunnar. Árini fram til fíggjarkreppuna í 2008 var stórur vøkstur í privatu nýtsluni hvørt ár. Síðan vóru trý ár við negativum vøkstri, og síðan 2011 hevur aftur verið positivur vøkstur. Vøksturin í 2014 er mettur at vera høgur, íalt 5,1%, og metingin fyri 2015 er 5,7%. Fyri 2016 og 2017 er metingin ávikavist 5,9% og 4,9%.

**Nýtsluútreiðslur í mió. kr. og vøksturin í % 1999-2017** **Mynd I 18**




**Kelda:** Hagstovan, *2014 til 2017 er framroknað við búskaparmyndli hagstovunnar

# I 3 Virksemið í privatu vinnugeirunum (privatar íløgur oa.) og innlendis eftirspurningurin

## I 3.1 Gongdin viðvíkjandi lønargjaldingum og løntakaratali

Lønarhagtølini frá Elektron (samtíðarskattaskipanini) eru millum tey bestu hagtølini vit hava til tess at lýsa virksemi í búskapinum sum heild og gongdina innan ymsu vinnugreinarnar[10].

Mynd I 19a og I 19b niðanfyri vísa prosent broytingina í lønartølunum frá Elektron seinastu árini sum leypandi ár-til-ár broyting (sí tekstkassa 3).

Mynd 19a vísir gongdina í lønargjaldingunum innan primeru og sekunderu vinnugreinarnar, meðan mynd 19b vísir gongdina í lønargjaldingunum innan tertieru vinnugreinarnar.

**Lønargjaldingar, á/á broyting í % bygt á leypandi 12 mðr sum, jan-07 til jun-16 — Mynd I 19a**




**Kelda:** Hagstova Føroya

**Lønargjaldingar, á/á broyting í % bygt á leypandi 12 mðr sum, jan-07 til jun-16 — Mynd I 19b**




**Kelda:** Hagstovan

10 Gongdin í lønartølunum frá Elektron samsvara ikki við gongdini í BTÚ sum inntøku (lønarpartinum av bruttofaktorinntøkuna stytt BFI). Orsøkin er millum annað, at BFI eisini fevnir um samsýning av kapitalinum (restinntøkan). Munur er eisini á tjóðarroknskaparlønum og elektronlønum, tí allar lønarviðbøtur eru ikki í elektronlønunum, td. pensióngjøld, tvungin sosial trygdargjøld og B-inntøkur.

***Tekstkassi 3:***
***Trend útrokningar, ið byggja á 12 mánaða leypandi samanlegging og miðal, herundir ár til ár %-broytingar, stutt frágreiðing:***
*12 mánaða leypandi samanlegging* er samanlegging av 12 undanfarnu mánaðunum, roknað fyri hvønn mánaða.
*12 mánaðar leypandi miðal* er miðal av seinastu 12 undanfarnu mánaðunum, roknað fyri hvønn mánaða.
*Ár til ár %-broytingar bygt á leypandi 12 mánaðar samanlegging ella miðal*. Týdningurin av hesum háttalagnum kann lýsast við einum dømi í mynd I 19 a og b (samlaðar lønir):
Vit leggja saman lønirnar 12 mánaðir aftur í tíðina frá jun-15 til jul-14 og gevur hetta 7,827 mia. kr. Vit leggja eisini saman 12 mánaðar aftur í tíðina frá jun-14 til jul-13 og gevur hetta 7,372 mia. kr. Ár til ár %-broytingin (ella vakstrar-ratan) verður so útroknað sum 7,827/7,372 – 1 = 6,2%.
Hetta háttalag verður nýtt ístaðin fyri vanliga háttalagið, har vøksturin verður roknaður higartil í árinum í mun til sama tíðarskeiðið árið fyri. Hvør mánaði verður her "roknaður upp" til eitt ársstøði. Tað verður roknað út hvussu %-vísi vøksturin (ella %-vísa fallið) hevur verið fyri hendan "upproknaða mánaðin" í mun til somuleiðis "upproknaða mánaðin" eitt ár frammanundan. Ein mánaði, ið víkir nógv frá undanfarnu mánaðunum, ger sostatt ikki so nógvan mun í "upprokningini". Sostatt er talan um eina serliga trend-analysu yvir fleiri mánaðir, har roynt verður av avdúka ein latentan trend í gongdini, sum fevnir yvir meira enn ein mánaða.

Vit síggja á myndunum at allar vinnugreinir hava vaksið seinastu tvey árini í lønargjaldingum, og at størsti vøksturin hevur verið í *primeru* og *sekunderu* vinnunum (ávikavist tilfeingis- og vøruframleiðsluvinnur íroknað bygging). Hinvegin hevur vøksturin innan *tertiervinnur* (ávikavist privatar og almennar tænastur sí mynd I 19b) verið meira avmarkaður, og minni enn miðal vøksturin fyri allar vinnugreinir. Vøksturin er tó minkaður nakað í vøruframleiðsluvinnum og tilfeingisvinnum seinasta árið. Vøksturin í almennum lønum er seinasta árið vaksandi eins og í privatum tænastuvinnum.

Lønirnar hjá tí almenna hava søguliga verið tær mest støðugu, meðan stór sveiggj hava verið í tilfeingisvinnunum og vøruframleiðsluvinnum. Í juni 2016 var ár-til-ár leypandi vøksturin í øllum lønargjaldingunum 6,5%. Størstur vøkstur sæst í vøruframleiðsluvinnum (8,1%) og tilfeingisvinnum (11,3%); vøruframleiðsluvinnur fevna m.a. um fiska-, kryvji- og flakavirkir, og eisini um byggivirksemi og skipasmíð. Lægri vøkstur hevur verið í almennu lønargjaldingunum (4,1%) og í privatu tænastuvinnunum (5,9%) td. fíggjarstovnar og smásølu.

Í talvu I 4 niðanfyri eru lønargjaldingar sambært *Elektron* býttar á 23 vinnugreinar. Eisini er víst beinleiðis vakstrarískoytið[11] og støddarlutfallið (parturin av øllum). *Tá støddarlutfallið er minni enn beinleiðis vakstrarískoytið, er vøksturin størri enn miðal.* Vit síggja at serliga fiskiveiða væntandi fer at hava ein stóran vøkstur uppá 25% hóast vinnugreinin bert fyllur 11%. Sama er galdandi fyri byggivirki, ið veksur við 11%, meðan støddarlutfallið er 6%. Fyri tað almenna eru tølini býtt í fýra bólkar. Her sæst at kommunur og ríkisstovnar eru vaksið við 15%, meðan støddarlutfallið er 11%, meðan heilsu- og almannaverk hevur eitt vakstrarískoyti uppá -1% og støddarlutfall uppá 11%. Ali- og kryvjivirkir rinda 3% av samlaðu lønunum, hóast alivinnan stendur fyri næstan helmingin av samlaða útflutninginum av vørum sambært talvu I 3, og fyri 6,7%[12] av samlaðu virðisøkingini í 2013.

[11] Sí mannagongd í talvu I 1. Í talvu I 4 er vakstrarískoytið tó skalerað til 100%.
[12] Sambært datagrunni Hagstovurnar.

**Talva I 4 Lønargjaldingar (sambært Elektron lønum), vakstrarískoyti og støddarlutfall fyri vinnugreinirnar í fyrsta hálvár 2015 og 2016**

| (mió. kr.) | 2015 1. hálvár | 2016 1. hálvár | Munur | Vakstrarískoytið | Støddarlutfall |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 7.258 | 7.888 | 630 | 0% | 0% |
| Fiskiskapur | 425.249 | 495.659 | 70.410 | 25% | 11% |
| Ali- og kryvjivirki | 134.507 | 151.479 | 16.972 | 6% | 3% |
| Ráevnisvinna | 31.073 | 26.763 | -4.310 | -2% | 1% |
| Fiskavøruídnaður | 152.290 | 168.825 | 16.535 | 6% | 4% |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 92.866 | 100.660 | 7.794 | 3% | 2% |
| Annar ídnaður | 115.600 | 123.956 | 8.356 | 3% | 3% |
| Bygging | 247.286 | 278.925 | 31.638 | 11% | 6% |
| Orku- og vatnveiting | 32.219 | 33.640 | 1.420 | 1% | 1% |
| Handil og umvæling | 353.284 | 366.659 | 13.375 | 5% | 9% |
| Gistihús og matstovuvirki | 47.800 | 52.035 | 4.234 | 1% | 1% |
| Sjóflutningur | 202.737 | 216.500 | 13.763 | 5% | 5% |
| Flutningur annars | 132.000 | 140.308 | 8.309 | 3% | 3% |
| Postur og fjarskifti | 68.819 | 70.166 | 1.347 | 0% | 2% |
| Fígging og trygging | 150.237 | 152.325 | 2.088 | 1% | 4% |
| Vinnuligar tænastur | 142.003 | 164.167 | 22.164 | 8% | 4% |
| Húshaldstænastur | 34.730 | 39.242 | 4.512 | 2% | 1% |
| Landsfyrisiting | 136.373 | 147.321 | 10.948 | 4% | 4% |
| Kommunur og ríkisstovnar | 430.832 | 473.582 | 42.750 | 15% | 11% |
| Undirvísing | 306.278 | 315.514 | 9.237 | 3% | 8% |
| Heilsu- og almannaverk | 514.719 | 512.777 | -1.942 | -1% | 13% |
| Felagsskapir, mentan o.a. | 93.804 | 95.226 | 1.421 | 1% | 2% |
| Ótilskilað v.m. | 787 | 3.015 | 2.228 | 1% | 0% |
| Tilsamans | 3.852.751 | 4.136.630 | 283.879 | 100% | 100% |

**Kelda:** Hagstovan (Elektron lønir)

Mynd I 20 niðanfyri vísir árstíðarjavnaða talið av løntakarum samanhildið við árstíðarjavnaða talið av fulltíðar arbeiðsleysum.

**Tal av løntakarum og fulltíðar arbeiðsleysum, árstíðarjavnað, jan-06 til apr-16** **Mynd I 20**




**Kelda:** Hagstovan

Við endan av 2010 fall løntakaratalið samstundis sum arbeiðsloysið vaks í sambandi við at Fiskavirking fór av knóranum. Í februar 2011 var talið av arbeiðsleysum sera høgt (2.015) samstundis sum talið av løntakarum var sera lágt (23.290).

Síðan tá (tvs. februar 2011) er talið av løntakarum vaksið, og tað var í apríl 2016 25.261, ella 1.971 fleiri enn í februar 2011. Serliga stórur hevur vøksturin verið síðan januar 2014[13]. 2014 var eitt ár við stórari nettotilflyting til Føroyar.

[13] Síðan januar 2014 er umleið 400 nýggir útlendskir ríkisborgarar skrásettir sum løntakarar, sambært serkoyring frá Hagstovuni. Danir eru her ikki roknaðir sum útlendingar.

Samstundis er talið av fulltíðararbeiðsleysum støðugt minkað síðan februar 2011. Í februar 2011 var talið av fulltíðararbeiðsleysum sum áður nevnt 2.015, og í november 2015 var talið minkað til 650. Hetta svarar til eina minking uppá 1.365 fulltíðararbeiðsleys.

## I 3.2 Gongdin viðvíkjandi privatu íløgunum

Mynd I 21 vísir privatu íløgurnar í mió. kr. og árliga vøksturin í privatu íløgunum í % árini 1999 til 2017. Íløgutølini eru skilmarkaði í samsvari við tjóðarroknskaparreglur. Myndin vísir, at stór sveiggj hava verið í privatu íløgunum; privatu íløgurnar eru vanliga tann mest sveiggjandi parturin av tjóðarroknskapar-útreiðslunum (sí eisini mynd I 2 í avsnitti I 1.1).

**Privatar íløgur í mió. kr. og árligur % vøkstur 1999-2017** **Mynd I 21**




**Kelda:** Hagstovan, 2014-2017 eru modeltøl

Nógvar av íløgunum eru framleiddar og innfluttar lidnar úr útlondum td. skip, vindmyllur og flogfør, og sæst hetta aftur í td. 2003, 2005 og 2012. Mynd I 22 vísir so bert innlendis framleiddu íløgurnar í tann mun tað hevur verið gjørligt at eyðmerkja hesar í innflutningshagtølunum. Orsøkin til at skilt verður ímillum hesi íløgusløg er at innlendis framleiddar íløgur kunnu leggja størri trýst á arbeiðsmarknaðin enn innfluttu íløgurnar. Konjunkturarnir síggjast í innlendis framleiddu íløgutølunum á tann hátt, at ein stórur vøkstur hendi upp til fíggjarkreppuna í 2007, og at eitt fall hendi í 2008 og 2009; annars hevur vøkstur verið øll árini síðan 2011. Stóri vøksturin frá í 2006 kemur fram, tí privatu innlendis framleiddu íløgurnar vóru serliga lítlar í 2005.

**Privatar innlendis framleiddar íløgur í mió. kr. og árligur % vøkstur 1999-2017** **Mynd I 22**




**Kelda:** Hagstovan, 2014-2017 eru modeltøl

## I 3.3 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum)

Vísitalið fyri byggivinnuna (sí mynd I 23 niðanfyri) gevur ábendingar um minkandi tal av bíleggingum, og eitt minni tal av bíleggingum enn í januar 2016. Men vinnan hevur samstundis í mun til seinastu teljing tryggjað sær arbeiði í miðal 14 mánaðar fram, sum er munandi meira enn í januar 2016, ið var 9 mánaðir fram.

Spurt kann verða um ov nógv byggiarbeiði verður gjørt í senn, og um privata og almenna íløguvirksemið kann minka knappliga um nøkur ár. Byggivirksemi er sum nevnt eitt hitt mest sveiggjandi virksemi í búskapinum, og hevur sum vera man stóra ávirkan á aðrar geirar í búskapinum.

Vanliga fylgir byggivirksemið konjunkturgongdini, men um førdur varð ein konjunktur-neutraliserandi fíggjarpolitikkur, átti tað almenna at tikið størri atlit til tíðarval, tá tað snýr seg um ígongdseting av íløgum og bygging fyri tað almenna. Eitt er at raðfesta íløgur og byggingar sum gerast skulu. Eitt annað er at tíðarvelja ígongdseting og stødd av neyðuga virkseminum.

**Vísitøl fyri byggivinnuna, jun-06 til jun-16** **Mynd I 23**




**Kelda:** Hagstovan

Í mynd I 24 niðanfyri eru vístar avmarkingarnar fyri framleiðsluna í byggivinnuni, sum byggiharrarnir hava nevnt sum viðkomandi. Tørvandi eftirspurningur var ein stórur trupulleiki frá 2008 og fram til januar 2014, men er tørvandi eftirspurningur nærvið ikki nevndur sum ein trupulleiki í dag. Tørvurin á arbeiðsmegi er vaksin aftur í juni 2016 í mun til januar 2016. Tá nógvar íløgur verða gjørdar í senn, er altíð ein vandi fyri trýsti á arbeiðsmarknaðin innan byggiyrkið. Slíkt trýst kann ávirka restina av búskapinum við prís- og lønarvøkstri. Umframt hetta kann trýst á arbeiðsmarknaðin innan byggiyrkið hava neiliga ávirkan á ígongdverandi byggiarbeiði, tá tað snýr seg um kostnað og góðsku.

**Treystitøl fyri byggivinnu - avmarkingar í framleiðsluni, jun-06 til jun-16** **Mynd I 24**




**Kelda:** Hagstovan

# I 4 Innlendis eftirspurningur frá almenna geiranum (almenn nýtsla og íløgur)

## I 4.1 Nýtsla hins almenna

Mynd I 25 niðanfyri vísir gongdina (í mió. kr.) og vøksturin (í %) í almennu nýtsluni síðan 1999, sum uppgjørt í tjóðarroknskapinum. Tølini fyri 2014 og 2015 byggja á metingar. Vøksturin í almennu nýtsluni er í 2013 uppgjørdur til 3,5%, og metti vøksturin fyri 2014 og 2015 eru ávikavist 0,3% og 1,5%. Metti vøksturin fyri 2016 og 2017 er ávikavist er 3,8% og 2,5%. Tølini eru í ársins leypandi prísum.

Frá 1999 til 2002 var vøksturin í almennu nýtsluni sera stórur (millum 8 og 11 %). Árini 2007 og 08 var eisini tilsvarandi stórur vøkstur í almennu nýtsluni. Vøksturin síðan tá hevur ligið millum 0 og 4 %.

Tølini benda á at broytingar í almennu nýtsluni hava verið konjunkturviðgangandi – tá nógv hevur verið í kassanum hevur nógv verið brúkt og øvugt - og hevur hetta økt heldur enn minkað um sveiggini í búskapargongdini. Umráðandi er tí hjá tí almenna ikki at endurtaka gongdina frá byrjanini av øldini og 2007 og 2008, um búskaparliga virksemið fer at økjast komandi árini.

Demografiskar broytingar í komandi árum fara at gera tað truplari at avmarka vøksturin í almennu nýtsluni (sí frágreiðing Búskaparráðsins frá vári 2015).

**Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og vøksturin í % 1999-2017** **Mynd I 25**




**Kelda:** Hagstovan, *2014 til 2017 er framroknað við búskaparmyndli hagstovunnar

## I 4.2 Íløgur hins almenna

Niðanfyristandandi mynd I 26 vísir almennu íløgurnar frá 1998 til 2017. Keldan til mynd I 26 er Hagstovan (almenna geira roknskapurin) og metingar Búskaparráðsins. Íløgurnar hjá sosialum grunnum og ríkisstovnum eru ikki tiknar við, tí talan er her um so smá tøl.

Talan er um íløgur samsvarandi tjóðarroknskaparuppgerð, og ikki samsvarandi roknskaparuppgerð. Tjóðarroknskapligu íløgurnar eru størri enn roknskaparligu íløgurnar; ma. er alt Landsverk og viðlíkahald (herundir alt á standardkonto 15 í landskassaroknskapinum) roknað sum íløgur í tjóðarroknskapinum.

Vit síggja ein týðuligan vøkstur í samlaðu almennu íløgunum frá 2015 til 2017. Vøksturin í almennu íløgunum frá 2015 til 2017 stavar bæði frá landinum, kommunum og kommunalum stovnum. Íløguvirksemi landsins er nógv ávirkað av bygging av Marknagilsdeplinum og Skálafjarðartunnlinum, har íløgan væntandi byrjar í 2016. Íløgur kommunanna hava verið støðugar síðan 2008, men vuksu

sera nógv fram til tá. Talan var í ávísan mun um íløgur, sum høvdu ligið á láni frá 90unum. Betringar í fíggjarstøðu kommunanna ávirkaðu eisini íløguhugin.

Kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015. Nógv bendir á at henda yvirtøka eisini fevnir um eina yvirtøku av einum rímuliga stórum íløgutørvi á eldraøkinum. Íløgurnar á heilsuøkinum hava verið stórar, men væntandi koma demografisku broytingarnar at krevja enn fleiri almennar íløgur á heilsuøkingum.

**Almennar íløgur í mió. kr. 1998-2017** **Mynd I 26**




**Kelda:** Hagstovan, Fyri *2014 -2017* er mett við støði í Búskaparráðsfrágr. á heysti 2015 s. 41-46 og nýtslu av búskaparmyndli Hagstovunnar

**Viðm.:** Talvan fevnur um allan almenna geiran (íroknað SEV, IRF, havnir og tunnilsfeløgini. (smb. talvu III 6 A)

Eins og við almennu nýtsluni (sí mynd I 25) eru gjørdu almennu íløgurnar konjunkturviðgangandi, bæði tá tað snýr seg um land og kommunur (sí mynd I 26 og I 27).

Sum nevnt er umráðandi hjá tí almenna er ikki at endurtaka gongdina við almennum íløgum frá 2007 og 2008, um virksemi fer at økjast komandi árini. Skuldarloftið hjá kommunum – at skuldin ikki skal koma upp um eina álíkning – eggjar eyðsæð ikki til miðvísa fíggjarpolitiska planlegging, ið fevnir um allar almennar íløgur. Tølini fyri 2014 til 2017 í øllum myndunum (I 25 til I 27) eru mett av Búskaparráðnum og Hagstovuni.

**Almennar íløguútreiðslur í mió. kr. og vøksturin í % 1999-2017** **Mynd I 27**




**Kelda:** Sí talvu I 26.

## I 4.3 Úrslitið á almennu roknskapunum

Mynd I 28 niðanfyri vísir eitt yvirlit yvir roknskaparúrslit landskassans (RLÚ 1) 2000 - 2017. Fyri árið 2016 eru metingar gjørdar av Hagstovuni um úrslitið, og fyri 2017 eru fíggjarlógarkarmar nýttir.

**Landskassaúrslitið RLÚ 1, 2000-2017** **Mynd I 28**




**Kelda:** Fíggjarmálaráðið og Hagstovan

Fyrimunarliga gongdin í konjunkturunum seinastu nógvu árini átti at givið grundarlag fyri at hallið á landskassaroknskapinum var minkað niður í einki fyrr, men verður hetta væntandi rokkið í 2016. Ein av forðingunum fyri hesum hevur verið demografiska gongdin, og fer demografiska gongdin at vera uppaftur meira avbjóðandi í komandi árum. Ein onnur forðing hevur verið mistar skattainntøkur frá føroyingum, ið arbeiða uttanlands. Ein triðja forðing hevur verið stóri vøksturin í lagaligari skattaðum kapitalinntøkum í mun til lønarinntøkum, ið eru undir størri skattatrýsti (sí mynd I 7).

Vit síggja at hallið hjá landskassanum (RLÚ 1) er minkað nógv síðan 2013, og væntar Fíggjarmálaráðið at fáa yvirskot í 2016 og 2017. Hinvegin gevur hetta RLÚ 1 úrslitið eina misvísandi mynd av veruligu haldførisstøðu landskassans. Uttan forskatting av pensiónum frá 2012 (við inntøkum uppá umleið 300 mió. kr. í 2015) hevði stór minking verið í skattainntøkum landsins, og uttan hesa forskatting hevði RLÚ 1 hallið verið tilsvarandi størri.

## I 4.4 Ogn og skuld hjá tí almenna

Mynd I 29 niðanfyri vísir gongdina í nettoogn og nettoskuld hjá tí almenna geiranum árini 2000 til 2017. Vit síggja á myndini at sosialu grunnarnir hava stóra nettoogn, og at landskassin og kommunurnar samlað hava eina nettoskuld. Nettoskuldin hjá almenna geiranum var útvið -3 mia. kr. í 2007 og er síðan støðugt minkað niður ímóti 0, tó er nettoskuldin vaksin eitt vet seinastu árini og verður væntandi -750 mió í 2017.

**Nettoskuld hjá almenna geiranum í Føroyum, 2000 til 2017** **Mynd I 29**




**Kelda:** Hagstova Føroya, meting fyri 2014 - 2017

Mynd I 29 byggir á eina meting av ogn og skuld hjá tí almenna geiranum, har m.a. skyldur landskassans fyri tænastumannapensiónir og rentugaranti til p/f Lív ikki eru tiknar við sum skuld[14]. Annars eru aðrar almennar ognir tiknar við til innara virði (td. Føroya Tele).

Niðanfyri standandi mynd I 30 vísir ogn og skuld landskassans frá 2000 til 2017. Vit síggja at bruttoskuldin er mett at vera nærum 6 mia. kr. í 2015 (ið svarar til 36% av BTÚ). Sum áður nevnt eru tænastumannaskyldur og aðrar veðhaldsskyldur landskassans ikki íroknaðar hetta tal. Um olja ikki verður funnin í rakstrarverdum nøgdum innan 1. januar 2018 fellur ein skuld uppá hálva milliard (500 mió. kr.) til danska ríkið burtur. Hetta betrar sjálvsagt nettostøðuna hjá landskassanum.

**Brutto ogn og skuld landskassans, 2000-2017** **Mynd I 30**




**Kelda:** Hagstova Føroya, meting fyri 2014 - 2017

Viðmerkjast skal eisini at í uppgerðini sum víst í mynd I 29 og I 30 liggja ognir fyri umleið 2 mia. kr, ið eru tungt umsetiligar, so sum Vágatunnilin, Fíggingargrunnurin frá 1992, og tunnilsfeløgini.

[14] Veðhaldsskyldur vegna tryggingaravtalu hjá Føroya Lívstrygging er gjørd upp til 1.213 mió. kr. í 2011. Nettoskylda landskassans fyri tænastumanna pensiónir er roknað til 3.325 mió. kr. Kelda: Føroya Gjaldsstova, landskassaroknskapurin fyri fíggjarárið 2013. s. 244.

# I 5 Útlendskur eftirspurningur (netto og brutto)

Mynd I 31 niðanfyri lýsir søguligu gongdina í útflutningsvirðinum av fiskavørum fyri tríggjar bólkar av fiskaútflutningi. Hesir bólkar eru *alifiskur*, *uppisjóvarfiskur* og *botnfiskur og onnur fiskasløg*. Hesir tríggir bólkar fevna um so at siga allan føroyskan vøruútflutning. Tann fjórði bólkurin av útflutningi er útflutningurin av tænastum (ma. ferðavinna).

**Útflutningur, leypandi 12-mánaðir samanlegging, jan-94 til jun-16** **Mynd I 31**




**Kelda:** Hagstova Føroya

*Alifiskur* fevnir um laks og síl, men nærum eingi síl verða útflutt í dag. *Uppisjóvarfiskur* fevnir um makrel, sild og svartkjaft, og harumframt hava vit tikið fiskamjøl við í hendan bólkin. *Botnfiskur og onnur fiskasløg* fevna um tosk, hýsu, upsa, svartkalva, gulllaks, longu, brosmu, rækjur oa. Hesi síðst nevndu fiskasløg verða veidd í bæði føroyskum sjógvi og aðrastaðni, td. í Barentshavinum og Flemmish cap.

Botnfiskurin hevur havt sera stóran týdning fyri útflutningin langt aftur í tíðina, men hevur ikki sama týdning í dag. Í 2012 vóru allir tríggir vørubólkar nøkulunda javnt stórir í stødd tá tað snýr seg um útflutningsvirði. Síðan er alifiskur vaksin enn meira í útflutningsvirði, meðan hinir bólkarnir hava staðið nøkulunda í stað. Vøksturin í útflutninginum av alifiski seinastu trý árini stavar frá prísvøkstri. Stórur vøkstur er í útflutningsvirðinum av *alifiski* seinasta árið, og er útflutningurin vaksin slakar 500 mió. kr. seinasta hálva árið. Útflutningurin av *botnfiski og øðrum fiskasløgum* er hinvegin minkaður við sløkum 100 mió. kr. seinasta hálva árið, og er útflutningurin av *pelagiskum fiski* vaksin við sløkum 100 mió. kr. seinasta hálva árið.

## I 5.1 Gongdin innan alivinnuna

Vísandi til mynd I 12 og I 13 í avsnitti I 1.5 sást at laksaprísirnir hava verið sera høgir fyrra hálvár 2016. Væntandi koma teir at minka eitt sindur vegna størri útboð seinna hálvár, og fara helst at liggja á umleið 55 NOK/kg í miðal restina av árinum. Hendan metingin byggir á samrøður við fólk í vinnuni.

Niðanfyri standandi mynd I 32 vísir tøkuna í føroysku alivinnuni seinastu árini. Tølini fyri 2015 byggja á metingar við ávísari óvissu. Mett verður at tøkan í 2016 verður 90 tTons, og at hon væntandi verður tann sama í 2017. Hetta er munandi størri enn í 2015 (umleið 10%) og størri enn í 2014.

**Tøka (livandi vekt) í alivinnuni 1999-2016** **Mynd I 32**




**Kelda:** Avrik sp/f, 2015 og 2016 er mett

Samanumtikið verður sostatt roknað við vøkstri í útflutningsvirðinum av alifiski í 2016 í mun til 2015. Útflutningsvirðið av alifiski var knappar 2,79 mia. kr. í 2015, og verður væntandi munandi hægri í 2016. Higartil í 2016 er vøksturin 38% fyrra hálvár í mun til fyrra hálvár 2015.

## I 5.2 Gongdin innan uppisjóvarvinnuna

Mynd I 33 niðanfyri vísir gongdina í landingarvirðinum av uppisjóvarfiskasløgum. Síðan 2009 hevur verið stórur vøkstur í samlaða landingarvirðinum. Samlaða landingarvirði er farið frá 432 mió. kr. í 2009 til at verða 1.357 mió. kr. í 2015. Landingarvirðini fyri 2016 og 2017 er treytað av millumtjóða avtalum.

**Landingarvirði av makrel, sild og svartkjafti, 2000 til 2015** **Mynd I 33**




**Kelda:** Vørn

Landingarvirði av *makreli* er vaksið nógv seinastu árini í samband við at Føroyar er farnar úr millumtjóða avtaluni um makrel. Síðan mars 2014 hava Føroyar so aftur verið í samstarvi við ES og Noreg um makrelin. Landingarvirðið av makreli fyri 2016 verður helst eitt sindur lægri enn 2015 vegna lægri heildarkvotu, hinvegin er makrelprísurin hægri higartil í ár. Landingarvirðið av *sild* vaks nógv fram til 2013, minkaði í 2014 og vaks nakað aftur í 2015. Ongin millumtjóða avtala var um sild fyri 2015, og eingin er heldur fyri 2016. Loksins er landingarvirðið av *svartkjafti* vaksið síðan 2011 vegna hækkaða heildarkvotu. Eingin millumtjóða avtala er heldur um svartkjaftin fyri 2015 og 2016.

Mynd I 34 niðanfyri vísir gongdina í útflutningsvirðinum av uppisjóvarfiski seinastu árini (sum leypandi 12 mánaðar samanlegging). Vit síggja, at vøksturin hevur verið sera stórur síðan 2009. Minking var í makrelútflutninginum mitt í 2014. Orsøkin til hesa minking var at útflutningurin vegna handilsforðingar frá ES hendi seinni í árinum, ella í byrjanini av 2015. Vøksturin í landingarvirðinum av svartkjafti sæst ikki so væl aftur í útflutninginum. Hetta kann vera tí at nógv av svartkjaftinum endar sum fóður til laksaframleiðslu í Føroyum, og endar harvið sum óbeinleiðis laksaútflutningur.

**Útflutningur av uppisjóvar fiski, leypandi 12 mánaðar samanl. jan-00 til jun-16** **Mynd I 34**




**Kelda:** Hagstovan

Samanumtikið vænta vit at samlaða útflutningsvirði í *uppisjóvarvinnuni* fer at vaksa frá 2015 til 2016. Hesin vøksturin er tó mettur at verða lítil.

## I 5.3 Botnfiskur og onnur fiskasløg

Fyri 2014 og 2015 eru ikki tær stóru broytingarnar í *botnfiskiveiðuni* at hóma tá talan er um nøgdir[15], men frá heystið 2015 hevur stórur prísvøkstur verið á botnfiski (20% vøkstur frá 2014 til 2015). Stórur partur av botnfiskaflotanum hevur verið í kreppu, meðan aðrar partar av botnfiskaflotanum hava havt nøktandi úrslit. Brexit merkir lægri prísir á botnfiski og øðrum fiskasløgum til bretska marknaðinum vegna lækkandi punds virði og merkir hetta væntandi minking ella stagnering í útflutningsvirði í 2016.

Samanumtikið meta vit, at tað fer at vera ein minking í útflutninginum av botnfiski og øðrum fiskasløgum í 2016 í mun til 2015.

## I 5.4 Samlaði fiskavøruútflutningurin

Mynd I 35 niðanfyri avmyndar samlaða útflutningsvirðið av fiskavørum frá januar 2000 til juni 2016 sum leypandi samanlegging.

Vøksturin seinastu árini hevur verið stórur. 'Hakkið' niðureftir í mynd I 34 og I 35 miðjan 2014 stavar frá handilstiltøkunum hjá ES fyri makrel og sild (sí eisini myndirnar I 36 og 37). Metast kann leystliga út frá myndunum, at hetta uppá stutt sikt hevur kostað Føroyum hálva milliard í útflutningsvirði, men helst er meira enn tað vunnið innaftur.

[15] Keldur til hetta brotið er Hagstovan og Vørn.

**Fiskavøruútflutningurin, virði, leypandi 12-mánaðir samanlegging, jan-00 til jun-16 Mynd I 35**




**Kelda:** Hagstovan

Samlaði vøksturin í fiskavøruútflutninginum í 2016 í mun til 2015 verður væntandi umleið 15%. Í løtuni eru eingi serlig viðurskifti, ið tala fyri stórvegis broytingum í útflutningsvirðinum av pelagiskum fiski, botnfiski og laksi í 2017 í mun til 2016. Tískil rokna vit við nærum null-vøkstri fyri útflutningsvirði av hesum fiskasløgum í 2017.

Ein fortreyt fyri hesum metingum er sjálvsagt, at vinnan ikki kemur út fyri størri broytingum.

## I 5.5 Gongdin í handilsjavnanum

Mynd I 36 vísir gongdina í handilsjavnanum sum leypandi 12 mánaðar samanlegging. *Handilsjavnin er útflutningurin av vørum minus innflutningin av vørum*. Mynd I 36 vísir, at handilsjavnin í 2016 hevur verið meira positivur enn hann hevur verið seinastu meira enn 20 árini. Hetta er grundað á eitt batnað býtislutfall, tvs. laksaprísir eru hækkaðir og oljuprísir eru lækkaðir og stórur vøkstur hevur verið í uppisjóvarfiskanøgdum. Í byrjanini av fíggjarkreppuni í 2008 var handilsjavnin negativur við 1.517 mió. kr. uttan skip. Í dag er handilsjavnin batnaður til 1.350 mió. kr. uttan skip. Hetta er ein betring uppá nærum 3 mia. kr. Mynd I 36 vísir eisini handilsjavnan við skipum, og á myndini sæst at serliga hesin innflutningur dregur handilsjavnan niðureftir. Stórur innflutningur av skipum ella flogførum einstøk ár kann lættliga eyðmerkjast í rásini á mynd I 36 fyri handiljavnan við skipum.

**Handilsjavnin, leypandi 12-mánaðir samanlegging, jan-94 til mai-16 Mynd I 36**




**Kelda:** Hagstovan

Mynd I 37 vísir gongdina í innflutningi og útflutningi av vørum (uttan skip) frá januar 1994 til mai 2016. Her sæst at handilsjavnin var serliga nógv negativur í 2008, og var tað innflutningurin, sum var serliga stórur árini 2006 til 2008. Fallið í innflutninginum var stórt í 2009 og 2010. Hetta fall hekk ma. saman við fallinum í privatu nýtsluni og íløgunum. Seinastu tvey árini hevur innflutningurin mestsum staðið í stað, meðan útflutningurin hevur hildið áfram við at vaksa.

**Inn- og útflutningur av vørum (ikki skip), leypandi 12-mð samanl., jan-94 til mai-16 Mynd I 37**




**Kelda:** Hagstovan

## I 5.6 Nettoútflutningurin av tænastum

Seinastu árini hevur verið stórur vøkstur í útflutningi Føroya av tænastum. Tænastuútflutningurin fevnir í høvuðsheitum um flutnings- og supply-tænastur, byggi-tænastur, ferðing og ferðavinnu, og leasing. Ein stór óvissa er um hesi tølini; trupulleikarnir við innsavning av hagtølum um hesi viðurskifti eru sera stórir. Talva I 5 niðanfyri gevur eina lýsing av útflutningi og innflutningi Føroya av tænastum fyri árið 2014. Tænastujavnin hevur í 2014 eitt hall uppá eina góða hálva milliard. Hetta hall stavar serliga frá halli í *ferðing*, *teldutøkni og kunning*, og í *mentan frítíð og heilsa* (heilsa fevnir ma. um viðgerð á donskum sjúkrahúsum). Nýggjari uppgerð av gjaldsjavnanum herundir nettotænastu útflutningi finnast ikki.

**Talva I 5 Útflutningur (inntøkur) og innflutningur (útreiðslur) av tænastum í 2014**

| (mió. kr.) | Útflutningur | Innflutningur | Netto (javni) |
|---|---|---|---|
| Flutningur | 478 | 406 | 72 |
| Ferðing | 343 | 623 | -280 |
| Samskifti | 104 | 62 | 42 |
| Byggitænastur | 177 | 216 | -38 |
| Tryggingartænastur | 0 | 28 | -28 |
| Fíggjartænastur | 11 | 34 | -23 |
| Teldutøkni og kunning | 3 | 131 | -128 |
| Royalti og lisensgjøld | 5 | 46 | -41 |
| Aðrar tænastur | 543 | 482 | 60 |
| Mentan, frítíð og heilsa | 36 | 213 | -177 |
| Tænastur íalt | 1701 | 2243 | -542 |

**Kelda**: Hagstovan

Samlaði útflutningurin av tænastum fer helst at minka nakað árini 2016 og 2017, vegna trupulleikar í offshore vinnuni.

# I 6 Samandráttur av fortreytum sum grundarlag fyri framrokningum við myndli

Niðanfyri standandi talva I 6 dregur í stuttum samanum fortreytirnar í frammanfyri standandi teksti. Hetta eru fortreytir, ið snúgva seg um útlitini fyri búskapargongdini árini 2014-2017. Hesar fortreytirnar hava verið nýttar sum inndata í myndli Hagstovurnar, ið nýttur verður til konsekvensútrokningar/ forsagnir av búskapargongdini.

Tølini í talvu I 6 niðanfyri eru fyri 2013 staðfest tøl frá tjóðarroknskapinum. Fyri 2014 og 2015 eru tølini viðvíkjandi vøruútflutningi og lønum staðfest tøl, restin eru mett tøl. Fyri 2016 eru tølini viðvíkjandi vøruútflutningi og lønum framroknaði tøl við grundarlagi gongdini í fyrru helvt av árinum. Fyri 2017 er talan um mett tøl sum grundgivið í frammanfyri standandi teksti.

**Talva I 6: Samandráttur av fortreytunum í frammanfyri standandi teksti**

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útflutningur vørur og tænastur (mió.kr.) | 7449 | 8063 | 8717 | 9826 | 9735 |
| Vøkstur (%) | | 8,2% | 8,1% | 12,7% | -0,9% |
| Almenn nýtsla (mió.kr.) | 4361 | 4372 | 4439 | 4608 | 4723 |
| Vøkstur (%) | | 0,3% | 1,5% | 3,8% | 2,5% |
| Almennar íløgur (mió.kr.) | 1031 | 1013 | 1105 | 1341 | 1536 |
| Vøkstur (%) | | -1,7% | 9,1% | 21,4% | 14,5% |
| Privat nýtsla sum lutfall av tøkum BTI | 0,844 | 0,87 | 0,88 | 0,88 | 0,89 |
| Privatar íløgur í % av BTÚ | 10,4% | 11% | 12% | 12% | 13% |
| Lønir sambært tjóðarroknskap (mió.kr.) | 8436 | 8864 | 9421 | 9978 | |
| Vøkstur (%) | | 5,1% | 6,3% | 5,9% | |

Viðmerkingar:
- Fyri útflutning av vørum og tænastum verður roknað við einari minking í 2017 í mun til 2016
- Fyri *almenna nýtslu* verður í 2016 væntaður ein størri vøkstur enn í undanfarnu frágreiðing
- Fyri almennar *íløgur* er í 2016 lagdur inn ein størri vøkstur enn í undanfarnu frágreiðing
- Fyri *privatu nýtsluna sum lutfall av tøkum BTI fyri húsarhaldssektorin* (nýtslukvotan) er lutfalstalið sett lægri enn í seinastu frágreiðing, tí ábendingar eru um minni vøkstur í privatu nýtsluni.
- Fyri *privatar íløgur í % av BTÚ* er lutfallið sett á sama støði sum í seinastu frágreiðing.
- Fyri *lønir* er 2014, 2015 og 2016 upproknað frá 'Elektron' lønum til tjóðarroknskaparlønir.

-

# Kapitul II: Um raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins

## II 1.1 Arbeiðshættir, avmarkingar og eftirspurningurin eftir arbeiði ráðsins

Við greiningum hevur Búskaparráðið í undanfarnu árum roynt at leggja fram viðkomandi tilfar, og at lýsa ymsar samanhangir, sum kunnu *styrkja grundarlagið undir politisku handfaringini av búskaparligu avbjóðingunum í langa siktinum - og av búskaparpolitikkinum annars í stutta og millumlanga siktinum.*

Á henda hátt er ráðgeving ráðsins farin fram so at siga umvegis. Greiningarnar hava verið dátu-grundaðar[16] tá til ber, men *ikki* við at fortelja politikarunum hvat teir í einstøkum førum neyvt skulu gera. Her hevur ráðið havt ta fatan, at "ognarrætturin" til búskaparpolitiskar avgerðir er politikaranna áleina.

Miðað hevur verið ímóti at greiða frá um torskild búskaparlig viðurskifti so einfalt sum møguligt, samstundis sum greitt hevur verið frá teimum (fyri leikfólk ofta torskildu) útrokningar-mannagongdum, ið ráðið hevur verið noytt at brúkt. Skrivligu frágreiðingarnar hava sostatt verið skrivaðar við atliti til eina javnveging (viðhvørt neyðsemju) millum tørvirnar *fyri fullfíggjandi einfalding í frágreiðingum* og fyri *fullfíggjandi skjalsanning av mannagongdum*.

Staðfest er at frágreiðingar ráðsins hava verið nógv eftirspurdar av politikarum, landsstovnum, kommunustýrislimum, vinnulívsfólkum og eisini av miðnáms-skúlanæmingum og studentum[17]. Ráðið hevur havt nógvar og væl vitjaðar framløgur fyri landsmyndugleikum, kommunum, peningastovnum, vinnulívsfólkum og áhugafeløgum.

Til dømis var hugtakið "fíggjarligt haldføri" ókent í føroyskum málbrúki fram til 2014, tá Búskaparráðið byrjaði at seta hetta evnið í dagsskránna í sínum frágreiðingum. Trupulleikarnir við haldførinum stava sum nevnt frá broytingum í demografisku aldurslutføllunum. Eftir 2014/2015 sýnist hetta hugtakið at vera blivið eitt viðkomandi hugtak í øllum orðaskifti um búskaparpolitikkin í Føroyum. Frágreiðingar ráðsins eru sjálvsagt serliga ætlaðar pørtunum í landspolitisku skipanini. Landspolitikaranna leiklutur er her sjálvsagdur; tað eru hesir, ið skulu taka tær yvirskipaðu avgerðirnar, og fremja tey yvirskipaðu átøkini í búskaparpolitikkinum.

Ætlingin við hesi seinastu frágreiðing í fýra ára skeiði núsitandi Búskaparráðs er at m.a. royna at lýsa hvussu *kommunurnar og kommunu-politikararnir* mest viðkomandi kunnu stuðlast til skynsamt at umsita kommunubúskapin, og harvið eisini at medvirka til tess at møta haldførisavbjóðingini.

Áðrenn kommunuviðurskifti neyvari verða viðgjørd (sí Kapitul III), skulu nakrar fleiri viðmerkingar gerast um raðfestingar av evnum eftir týdningi (prioriteringar).

## II 1.2 Málsevni tikin fram eftir týdningi

Tey evni, ið Búskaparráðið hesi 4 árini hevur viðgjørt í sínum frágreiðingum, samsvara væl við tað, ið ráðið natúrliga og av egnum ávum hevur mett og empiriskt staðfest sum tað mest viðkomandi (relevanta) at seta í miðdepilin. Umframt regluligu konjunktur-metingarnar hava hesi málsevni verið viðgjørd[18]:

- Demografiskar broytingar og fíggjarligar avleiðingar
- Fíggjarliga haldførið hjá almenna geiranum
- Almennar íløgur og almenn nýtsla í einum konjunkturviðgangandi ella konjukturneutraliserandi búskapar-politikki
- Arbeiðsmarknaðurin, arbeiðsvirkni og útbúgvingar

[16] Ráðið hevur í sínum arbeiði vanliga tikið útgangsstøði í tøkum dátutilfari og útvegan og greining av hesum dátutilfari (tvs. empiriskari búskaparfrøði), men hevur í høvuðsheitum *ikki* tikið *útgangsstøði* í kendum ástøði á økinum. Aftaná lidnar dátu-greiningar er sammett við kend ástøði á økinum, tá hetta hevur verið viðkomandi. Møguliga kann sigast at arbeiðsháttur ráðsins hevur verið meira induktivur enn deduktivur. Ein *deduktivur* arbeiðsháttur vildi merkt at gongdirnar í føroyska búskapinum blivu forkláraðar út frá kendum ástøði á økinum; hendan arbeiðshátt hevur ráðið í høvuðsheitum valt *ikki* at byggja sínar greiningar á.

[17] Frágreiðingarnar hava verið prentaðar í 400 eintøkum og eru eisini tøkar á heimasíðu ráðsins undir Fróðskaparsetrinum http://www.setur.fo/buskaparradid/fragreidingar/

[18] Búskaparfrágreiðingar heyst 2013, vár 2014, heyst 2014, vár 2015, heyst 2015, vár 2016.

- Búskaparrenta og tilfeingisrenta
- Lutfalsliga støddin av pensiónsuppsparingini hjá føroyingum og avleiðingar
- Eldrarøktarøkið og tess fígging
- Kommunurnar og kommunubúskapurin

Sum nevnt hevur ein onnur høg raðfesting Búskaparráðsins verið at miðla innihald og úrslit av greiningunum til allar áhugabólkar.

## II 1.3 Tilmæli um at skilja millum stutta og langa siktið

Sambandið millum *búskaparvøkstur* og *arbeiðsvirkni* og sambandið millum *búskaparvøkstur* og *fíggjarligt haldføri* hevur verið viðgjørt í undanfarnu frágreiðingum ráðsins[19]. Hesar viðgerðir skulu ikki endurtakast her. Í staðin skulu nakrir viðmerkingar gerast um týdningin av at skilja millum *stutta siktið* (t.d. ½-5 ár fram) og *langa siktið* (t.d. 30 ár fram), tá metingar skulu gerast av búskaparvøkstrinum og búskapargongdini. Eisini er viðkomandi at taka við tað *millumlanga siktið* (t.d. 10 ár fram); tað er í *millumlanga siktinum* at møguleikarnir stigvíst liggja fyri at gera nakað við gongdina í tí langa siktinum.

*Búskaparvøksturin* er prosentvísi árligi (ella kvartalsligi) vøksturin í BTÚ, tá BTÚ er roknað í føstum prísum. Hesin vøkstur kann vera positivur ella negativur. Vegna tøkni-treytaðan arbeiðsproduktivitetsvøkstur (t.e. vøkstur í virðisøking í føstum prísum pr. arbeiðstíma) er búskaparvøksturin í *langa siktinum* vanliga positivur; í *stutta siktinum* er búskaparvøksturin negativur í niðurgangandi konjunktursveiggjum.

Í Føroyum gera vit bert BTÚ upp í leypandi prísum. Hetta merkir at vit í Føroyum ikki kenna búskaparvøksturin, sum er árligi vøksturin í BTÚ í føstum prísum. Vit noyðast tí at halda okkum til BTÚ í leypandi prísum, tá vit (í Kapitul I í búskaparráðsfrágreiðingini) skulu meta um framtíðar búskapargongdina í tí *stutta siktinum.*

At meta um framtíðar gongdina í BTÚ í leypandi prísum er sera trupult. Prísgongdir í uttanlandshandlinum (innflytningi og útflutningi) hava seinnu árini stórliga ávirkað uppgjørda BTÚ-ið í leypandi prísum. At gera metingar av framtíðar prísgongdum í m.a. uttanlandshandlinum er sera trupult, og hetta ger eisini metingina av BTÚ-vøkstrinum í leypandi prísum meira óvissa. At gjørt meting av BTÚ-vøkstrinum í føstum prísum hevði gjørt tað einfaldari at mett um búskapargongdina og hevði minkað um óvissuna í metingunum, tí tá kundu vit sæð burtur frá væntaðum prísbroytingum í m.a. uttanlandshandlinum.

Konjunktursveiggj henda í *stutta siktinum*. Hesi *konjunkturveiggj* kunnu eyðmerkjast sum afturvendandi "sveiggj" upp um og niður um langtíðartrendin (t.d. trendin yvir eini 10-30 ár) í gongdini á ymsum búskaparligum støddum, herundir serstakliga sum "sveiggj" upp um og niður um langtíðartrendin á BTÚ uppgjørt í føstum prísum.

Búskapurin er alla tíðina ávirkaður av ymsum sløgum av "stoytum" sum - til eitt ávíst mark - kunnu virka sum "sjálvforsterkandi" ringrásir bæði í uppgongd og niðurgongd. Hesir "stoytir" gera at búskapurin til tíðir veksur skjótari enn tann til grund liggjandi framleiðslukapasiteturin í búskapinum - og eisini at hann til tíðir veksur seinri enn framleiðslukapasiteturin í búskapinum. Hetta ger at búskapurin (soleiðis sum hann faktiskt verður uppgjørdir sum BTÚ í føstum prísum) ikki veksur javnt yvir tíð. Vøksturin hendir sum "sveiggj" upp um og niður um trendin í gongdini. (Nógvir grafar í kapitul I vísa slík sveiggj).

Tá eftirspurningur og framleiðsla liggja *omanfyri* trendin fyri framleiðslukapasitetin, merkir hetta tíðir við hákonjunkturi. Tá hinvegin eftirspurningur og framleiðsla liggja *niðanfyri* trendin fyri framleiðslukapasitetin, merkir hetta tíðir við lágkonjunkturi[20]. Útrokningar Fíggjarmálaráðsins vísa at í

[19] Búskaparráðsfrágreiðing heystið 2013, síða 8-12; Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2016, síða 71
[20] Smidt, John; Linaa, Jesper (2014): *Vækst på kort og langt sigt* . Samfundsøkonomen nr. 1 marts 2014

árunum 2008-12 var lágkonjunkturur, í 2013 var normalkonjunkturur, og at hákonjunkturur hevur verið síðan 2014[21].

Viðkomandi kann vera at skilja ímillum *tvey "sløg" av búskaparvøkstri*[22]:

(1) ***Búskaparvøkstur í tí stutta siktinum,*** ið verður íbirtur og hildin uppi av konjunktursveiggjum. Vanliga er hesin búskaparvøkstur íbirtur av broytingum í ***eftirspurnarsíðuni*** í búskapinum, t.v.s. "stoytum" sum til eitt mark geva "sjálsforsterkandi" ávirkanir í eftirspurningi frá almennari og privatari nýtslu og íløgum og frá nettoútflutningi – bæði í upp- og niðurgongd. Hetta er *tó ikki uttan undantøk*, og serliga ikki fyri Føroya viðkomandi. Støðan hjá fiskastovnunum og broytingar í fiskiveiðu og aling kunnu sjálvsagt eisini geva "stoytir" stavandi frá útboðssíðuni í búskapinum og sum raka eftirspurnarsíðuna, og harvið íbirta há- og lágkonjunktur. Avgerandi fyri konjunkturgongdina er í hvønn mun eftirspurnarsíðan er før fyri at eftirspyrja og taka ímóti eini broyttari framleiðslu á nøktandi hátt í tí *stutta siktinum*.

(2) ***Búskaparvøkstur í tí langa siktinum,*** ið verður íbirtur og hildin uppi av øðrum viðurskiftum enn konjunktursveiggjum, og serstakliga av tøknitreytaðum (tvs. ikki-konjunkturtreytaðum) broytingum í arbeiðsproduktiviteti og broytingum í ikki-konjunkturtreytaðum arbeiðsvirkni. Hesin búskaparvøkstur er sostatt íbirtur og hildin uppi av broytingum í framleiðsluførleikanum á **útboðssíðuni** í búskapinum. Roknað verður við at samsvarandi tillagingar henda á eftirspurnarsíðuni í búskapinum í tí langa siktinum.

Tað BTÚ-ið, sum verður gjørt upp av Hagstovuni, fevnir bert um tað *faktiskt staðfesta BTÚ-ið*. Hetta *faktiskt staðfesta BTÚ-ið* hevur í sær íkast frá konjunktursveiggum, eins væl og íkast frá ikki-konjunkturtreytaðum produktivitetsvøkstri og arbeiðsvirknisvøkstri.

Fíggjarmálaráðið er byrjað at nýta serligar roknihættir til tess at "reinsa" *faktiskt staðfesta BTÚ-ið* fyri ávirkanum av konjunktursveiggjum[23]. Úrslitið verður *ein roknað støðd fyri BTÚ (strukturelt BTÚ)*, ið er óávirkað av konjunkturum, men einans hevur í sær íkast frá arbeiðsproduktivitetsvøkstri og arbeiðsvirknisvøkstri.

Saman við útrokning Fíggjarmálaráðsins av ikki-konjunkturtreytaðum BTÚ, tvs. *strukturellum BTÚ*, fer Fíggjarmálaráðið væntandi eisini at kunna útrokna *strukturelt arbeiðsloysi* (ikki-konjunkturtreytað arbeiðsloysi) og *strukturelt arbeiðsvirkni* (ikki-konjunkturtreytað arbeiðsvirkni).

*Hesar umrøddu útrokningar Fíggjarmálaráðsins eru - sum nú er - á byrjunnarstigi. Útrokningarnar eru nógv darvaðar av tvørrandi dátutilfari, herundir serliga av tvørrandi uppgerð av BTÚ í føstum prísum. Á verandi støði mugu úrslitini av hesum útrokningum tí metast við stórum fyrivarni*[24].

Í sama viðfangi sum Fíggjarmálaráðið roynir at rokna út *strukturella BTÚ-ið*, roynir Fíggjarmálaráðið eisini at rokna út *strukturellu saldoina*[25] (ikki-konjunkturtreytaðu saldoina) hjá almenna geiranum, og hesa sum prosent av *BTÚ*. Tá hendan strukturella saldo verður útroknað, verður eisini sæð burtur frá eingangsinntøkum og –útreiðslum.

---

Konjunkturar koma og fara. Neyvan nakar ivast í, at lágkonjukturur kemur aftur, men nær veit eingin við vissu[26]. Búskaparráðið metir at seinasta gongdin í fólkatalinum í Føroyum og í nettotilflytingini í ein stóran mun eru konjunkturtreytað. Sama er galdandi fyri gongdina í øðrum búskaparligum lyklatølum í seinastuni. *Búskaparráðið er av tí fatan, at meira dentur eigur at verða lagdur á tann búskaparvøkstur,*

[21] Fíggjarmálaráðið mars 2016: Búskaparfrágreiðing I, síðu 46.
[22] Smidt & Linaa, op.cit.
[23] Fíggjarmálaráðið mars 2016: Búskaparfrágreiðing I, síðu 46-48.
[24] Fíggjarmálaráðið hevur m.a. verið noytt at nýta brúkaraprístalið til tess at meta um gongdina í BTÚ í føstum prísum. Hetta kann geva skeivleikar í útrokningunum.
[25] "Strukturel saldo" nevnist eisini "konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geira" ella á enskum "cyclically adjusted budget balance".
[26] Útrokningar Fíggjarmálaráðsins vísa annars at styrkin á "automatisku stabilisatorunum" (sí orðalista) í føroyska búskapinum er lítil, tá sammett verður við aðrar búskapir. Hetta hevur ivaleyst samband við støðd av (og innihald í) inntøkusíðu + útreiðslusíðu vøru- og tænastujavnans í mun til allan búskapin.

*ið er ótreytaður av konjunkturum. Hetta merkir at meira ansur eigur at verða givin útboðssíðuni í búskapinum.*

Omanfyri umrøddu útrokningar Fíggjarmálaráðsins áttu at givið betri møguleikar at venda ansinum móti gongdini í búskapinum í tí *langa og millumlanga siktininum*, og serliga *útboðssíðuni* í búskapinum. Tað er við atliti til langa og millumlanga siktið og útboðssíðuna í búskapinum, at vit stigvíst kunnu gera nakað munagott fyri at byrgja fyri skeivleikum í demografisku gongdini og avbjóðingunum viðvíkjandi fíggjarliga haldførinum.

Búskaparráðið metir at *strukturella saldoin fyri allan almenna geiran* vildi verið ein meira viðkomandi stødd at stýra búskapinum eftir enn bert RLÚ-úrslit landskassans, ið er ávirkað av verandi hákonjunkturi.

*Búskaparráðið mælir til eina uppraðfesting av nevndu útrokningum Fíggjarmálaráðsins av strukturellu salduni fyri almenna geiran, strukturellum BTÚ, strukturellum arbeiðsvirkni og strukturellum arbeiðsloysi. Slík uppraðfesting má eisini fevna um eina uppraðfesting av arbeiði Hagstovunnar við at gera upp BTÚ í føstum prísum.*

Búskaparráðið mælir eisini til at mál verða sett fyri loyvdu støddini á hallinum á *strukturellu saldoini*, og ein politikkur verður settur út í kortið, ið snýr seg um hvussu *strukturella saldoin* hjá almenna geiranum stigvíst verður betrað.

Tað eru nøkur týðandi poeng við í størri mun at venda ansinum móti skilnaðinum millum *stutta og langa siktið*. Tað er ivaleyst soleiðis at búskaparpolitisk tiltøk, sum ávirka búskaparvøkstur og arbeiðsvirkni í *stutta siktinum* (eftirspurnarsíðuna í búskapinum), ikki gagna stórvegis í tí *langa siktinum* (útboðssíðuni í búskapinum). Og øvugt – at búskaparpolitisk tiltøk, ið skapa búskaparvøkstur og arbeiðsvirkni í langa siktinum, ikki gagna stórvegis í tí stutta siktinum[27].

Fiskivinnunýskipan, pensiónsnýskipan, arbeiðsmarknaðarnýskipan við vaksnamannalæru fyri strukturelt arbeiðsleys, útflutningsatgongd til útlendskar marknaðir, og tiltøk til tess at minka um nettofráflytingina, snúgva seg í høvuðsheitum um útboðssíðuna í búskapinum, og kunnu helst at byrja at vísa úrslit í *millumlanga og langa siktinum*.

Í *langa siktinum* er tað útboðið av skikkaðari arbeiðsmegi, náttúrukapitali og vanligum kapitali, sum saman við arbeiðsproduktivitetsvøkstri avgera búskapar- og fólka- og arbeiðsvirknisvøksturin og harvið fíggjarliga haldførið hjá almenna geiranum. Ein avbjóðing er at útvega førleika-samsvarandi arbeiðspláss til tey nógvu, ið eru undir hægri lestri í Føroyum og uttanlands (sí avsnitt II 1.5 og II 1.6)[28].

---

Tvørrandi búskaparstýringin av kommunala geiranum og stóra samanfallið av almennum íløgum í einum hákonjunkturi hava ivaleyst - til eitt ávíst mark - "sjálvforsterkandi" ávirkanir á eftirspurnarsíðuna í búskapinum. Rikni politikkurin má sigast at umboða ein *konjunkturviðgangandi* búskaparpolitik. Ein slíkur politikkur ger "sveiggið" uppeftir í hákonjunkturinum størri enn tað annars vildi verið, og eisini "sveiggið" niðureftir í einum eftirfylgjandi lágkonjunkturi størri enn tað annars vildi verið. Hetta kann eisini hava eina darvandi ávirkan á búskapargongdina í *langa siktinum*.

Tørvur er á at raðfesta almennu íløgurnar eftir tí týdningi, ið hesar íløgur hava fyri búskapargongdina í tí *langa siktinum*. Tørvur er eisini at raðfesta almennu íløgurnar eftir teirra eftirspurnarárinum á búskapin *í stutta siktinum*. Slíkar raðfestingar gerast neyvan uttan eisini at dúva uppá metingar, men Búskaparráðið er tó av tí fatan, at ein slíkar raðfestingar kortini eiga at verða royndar.

Tørvur er eisini á nýggjari lóggávu um útreiðsluloft (játtanarkarmar) fyri kommunala geiran, og eini samskipan millum kommunala búskapin og landsbúskapin, herundir av íløgunum. Tørvur er eisini á eini

[27] Smidt & Linaa, op.cit.
[28] Sí Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2016, kapitul II, síðu 42-71.

lóggávu um hvussu at verður borið (um avleiðingar), tá farið verður upp um ásettu útreiðsluloftini bæði hjá kommunum og hjá landi[29]. Útreiðsluloft (játtanarkarmar) verður sostatt samanfallandi við fíggjarætlan (játtan).

Búskaparpolitisk mál fyri gongdina í *millumlanga siktinum* (tvs. eini 10 ár fram) eiga eisini at verða sett. Saman við hesum málum eiga samsvarandi nýskipanarætlanir at verða viðgjørdar og settar út i kortið.

## II 1.4 Týdningurin av búskaparpolitiskum haldføri

Í undanfarnum frágreiðingum í 2015 og 2016 hevur Búskaparráðið lagt serligan dent á at lýsa ta *fíggjarligu haldførisavbjóðing*, sum *almenni geirin í Føroyum* vegna broytt aldursbýti kemur at standa í um ikki so langa tíð.

Fyri so vítt stendur almenni geirin longu nú yvir fyri í hesi haldførisavbjóðing. Í fíggjarlógararbeiðinum hjá t.d. Heilsumálaráðnum og Almannamálaráðnum merkist hetta longu nú. Hjá hesum báðum útreiðslutungu ráðunum eru útreiðslurnar serliga nógv aldurstreytaðar. Hendan aldurstreytingin er so mikið stór, at sambandið millum heilsurøktarkostnað og aldur, og eldrarøktarkostnað og aldur, eisini mugu takast við sum meginfortreytir í fíggjarlógararbeiðinum. Hetta hevur ikki verið so neyðugt fyrr. Eisini stendur Fíggjarmálaráðið vegna broytta aldursbýtið yvir fyri somu avbjóðingum, tá tað snýr seg um framrokningar av almennum inntøkum.

Til dømis vita vit at heilsurøktartørvurin útreiðsluliga veksur nógv við aldrinum fram til 90 ára aldur, og byrjar longu at vaksa frá 40-50 ára aldri. Ein tilsvarandi samanhangur ger seg galdandi fyri eldrarøktar- og eldraveitingarútreiðslurnar[30].

Haldføristrupulleikin er í fyrstu atløgu ein *trupulleiki fyri almenna geiran*. Vegna støddina og týdningin av almenna geiranum gerst haldføristrupulleikin eisini ein avleiddur trupulleiki fyri alt føroyska samfelagið, og allan føroyska búskapin.

*Almenni geirin í Føroyum* fevnir fyrst og fremst um landið og kommunurnar (herundir kommunalu yvireindirnar á eldrarøktarøkinum), og eisini um almannagrunnarnar (ALS, AMEG, Barsilsgrunn, Trygdargrunn, Vinnusjúkugrunn, Heilsutrygd), og um uppgávur danska ríkisins í Føroyum.

*Hesa haldførisavbjóðing - og viðurskifti tengd at hesi haldførisavbjóðing – hevur sitandi Búskaparráð mett sum eitt hitt mest viðkomandi búskaparevni at fáa lýst í sínum 4-ára skeiði, herundir at fáa útroknað í tølum, og at fáa forklárað í týdningi.*

Í tekstkassa 4 endurtaka vit forkláringina av, hví forskatting av pensiónum ger fíggjarliga haldførið verri.

**Tekstkassi 4:**
**Forskattingin av pensiónum og versnanin av fíggjarliga haldførinum**

Í undanfarna valskeiði fingu hægru inntøkubólkarnir ein skattalætta, ið segðist verða fíggjaður við at *forskatta* øll framtíðar pensiónsinngjøld við 40%. Reglan áðrenn hesa broyting var skattafrádráttur fyri pensións<u>inngjøld</u> og skatting (*eftirskatting*) av pensións<u>útgjøldum</u> við útgjald (35% fyri kapitalpensión og vanligur skattur fyri onnur pensiónssløg).

Fyri fíggjarliga haldføri almenna geirans merkti hetta at *framtíðar inntøkur og framtíðar nýtslumøguleikar almenna geirans* – stavandi frá framtíðar eftirskatti av pensións<u>útgjøldum</u> – nú vórðu "offrað" til frama fyri "her-og-nú-nýtslu" av skattainntøkunum frá forskattingini.

[29] Donsku reglurnar fyri avleiðingar fyri kommunurnar, tá farið verður upp um útreiðsluloftið, eru í stuttum at kommunurnar missa part av blokkstuðinum frá statinum. Allar kommunur verða raktar av hesum missi, men mest tann kommuna, sum fer upp um loftið. Hetta ger at kommunurnar ansa væl eftir ikki at fara upp um útreiðsluloftið. Sí Rene Ansbøl (2014): Økonomisk styring i kommunerne, Samfundslitteratur, síða 87.
[30] Sí Búskaparráðsfrágreiðing frá vári 2015, síðu 48- 50.

Vit kunnu siga at givið skattalættan til hægru inntøkubólkarnar (minking av almennum inntøkum), var tað forskattingin av pensiónum (vøkstur í almennu inntøkunum), sum gjørdi tað møguligt at fáa peningin til vega til "her-og-nú-fígging" av eldrarøktarøkinum í kommunalum regi.

Eisini kann sigast, at tað sum eftir gomlu reglunum (tvs. eftirskatting) skuldi goymast til seinni brúk, beinan vegin var tikið inn og brúkt – brúkt til skattalætta fyri hægru inntøkubólkarnar. Eingi atlit vóru tikin til at goyma, (og ikki at nýta) peningin frá forskattingini til at rinda fyri framtíðar útreiðslutørvir almenna geirans, *ið vit vita fara at vaksa stórliga í komandi árum*. Eingi tiltøk vóru gjørd til tess at fíggja skattalættan á regluligan hátt - nevniliga við tilsvarandi at skerja útreiðslur almenna geirans, ella við at krevja tilsvarandi meira inn í øðrum skattum og avgjøldum. *Okkara niðurstøða má tí vera at skattalættin var ófíggjaður, og at hann versnar um fíggjarliga haldføri almenna geirans.*

Samstundis varð *inntøkusíðan av eini nýggjari pensiónsskipan* sett í verk. Hendan nýggja pensiónsskipan álegði øllum eftir eina 15-ára skiftistíð at gjalda inn 15% av inntøkuni til egna pensión; tey 15%-ini (fyri tey ið ikki longu rukku tey) skuldu røkkast eftir eini upp til 15-ára skiftistíð.

Eyðsæð veksur hendan pensións-nýskipanin um framtíðar føroysku pensións-uppsparingina[31], og harvið eisini um inntøkumøguleikar almenna geirans frá hesi somu pensiónsuppsparing. Vøksturin av pensiónsuppsparingini merkir tískil – alt annað líka - ein bata fyri fíggjarliga haldføri almenna geirans.

Av tí at aldurstreytaði útreiðslutørvur almenna geirans fer at vaksa stórliga í komandi árum, hevði ein *eftirskatting* av pensiónsútgjøldunum borið við sær at peningurin var meira rættstundis tøkur, tá brúk var fyri honum. Skuldi hetta seinasta eisini verið lúkað við *forskatting*, skuldi peningurin frá eini *forskatting* ikki verið nýttur her-og-nú, men goymdur til seinni brúk. Varð útreiðslutørvurin hjá almenna geiranum hinvegin vaksandi í næstkomandi árum, og við útliti til minking skjótt eftir tað, kundi ein forskatting verið upp á sítt pláss. *Hetta broytir ikki okkara omanfyri standandi niðurstøðu um forskattingina av pensiónum og nýtsluna av henni í givna førinum, og avleiðingarnar fyri fíggjarliga haldførið.*

Viðhvørt hevur verið ført fram frá politiskari síðu at ein skattalætti til háinntøkurnar fíggjar seg sjálvan gjøgnum størri arbeiðsvirkni (arbeiðsútboð), og økta privata nýtslu (eftirspurning), og harvið eisini avleitt økt arbeiðsvirkni, og harvið øktar skattainntøkur – tvs. við eini "*niðurseyring*" frá hægru til lægru inntøkubólkarnar. Vit kunnu ikki avvísa at hetta partvíst kann gera seg galdandi – viðhvørt, og viðhvørt ikki. Hinvegin ber til at staðfesta at ein skattalætti ongantíð fíggjar seg sjálvan fult út, og tí er altíð neyðugt við tiltøkum á annahvørt inntøku- ella útreiðslusíðuni. Samljóðandi empiriskir búskaparlitteraturar um "niðurseyrings-ástøðið" eru ringir at finna[32].

Sum nevnt fer framtíðar demografiska gongdin at skeikla javnvágina millum inntøkuvøkstur og útreiðsluvøkstur almenna geirans. Fleiri fólk í pensións- og røktarkrevjandi aldri og færri fólk í arbeiðsførum aldri fara at trýsta útreiðsluvøkstur almenna geirans uppeftir og inntøkurvøksturin niðureftir. "Fíggjarligt haldføri" er eitt mát fyri samsvarið millum inntøkur og útreiðslur almenna geirans yvir eitt longri áramál. Roknaði haldføris-indikatorurin gevur eitt svar upp á hendan spurning:

Hvat skal til í útreiðsluskerjing / inntøkuvøkstri hins almenna, fyri at nettoskuld almenna geirans sum % av BTÚ skal vera tann sama í 2050 sum í 2013?

Roknaða haldføris-indikatorurin, sum ikki er eitt úrslit av eini prognosu, men úrslit av eini konsekvens-rokning, var -5%. Hetta merkir at ein árlig varandi útreiðsluskerjing / inntøkuvøkstur skal til fyri at halda nettoskuldini óbroyttari, sum í 2013-krónum svaraði til 750 mió kr.[33] Búskaparráðið fer við eitt seinni høvi at endurrokna haldførisútlitini við dagførdum tølum – nýggj búskaparpolitisk tiltøk og broyttar inntøkufortreytir kunnu altíð broyta talmátið fyri haldførið.

[31] Føroyska pensiónsuppsparingin var í 2011 sera lítil sammett við grannalondini, sí búskaparráðsfrágreiðingina fyri heystið 2013, síða 19, og búskaparráðsfrágreiðingina fyri várið 2015, síða 65.
[32] Birgitte Smith Lange, De økonomiske konsulenter, Folketinget: "Rapport om dynamiske effekter og marginalskat m.v.", notat 16. juni, 2016.
[33] Í hesa útrokning er fortreytin um "heilsubetri elding" løgd inn; grundgevast kann tí fyri, at úrslitini av útrokningini eru í so bjartskygd.

## II 1.5 Demografiska avbjóðingin lýst eitt sindur øðrvísi

Í sambandi við haldførisútrokningarnar hjá Búskaparráðnum var staðfest at allur haldføristrupulleiki almenna geirans stavar frá demografisku broytingunum[34].

Mynd II 1 niðanfyri samanfatar demografisku avbjóðingina á ein øðrvísi hátt. Mynd II 1 vísir søguligt fólkatal og framroknað fólkatal millum 16-66 ára gomul og 67 ára gomul og eldri, og lutfallið millum talið av 16-66 ára gomlum og 67 ára gomlum og eldri. Av myndini framgongur at lutfallið millum millum talið av 16-66 ára gomlum og talið av 67 ára gomlum og eldri er minkað og framhaldandi fer at minka stórliga. Lutfallið var 5,26 í 2009, og í 2016 var tað 4,27. Fyri 2037 er lutfallið framroknað til 2,37, og fyri 2048 tað framroknað til 2,07[35].

Ein væl grundgivin spurningur kundi verið, um eitt samfelag við slíkum lágum lutfalli kann hanga saman fíggjarliga og á annan hátt.

Tó so – eitt stórt tal av økjum (kommunum og øðrum útryðjuøkjum) finnast við einum slíkum lágum lutfalli. Hetta eru tó øki, sum í so máta ikki kunnu sammetast við Føroyar. Hesi øki verða nevniliga hildin uppi fíggjarliga av tí størra samfelagi (landi ella ríki), ið tey eru ein sameindur partur av. Soleiðis er ikki við Føroyum, ið hava tikið sær ábyrgdina av egnum almennum inntøkum og almennum útreiðslum. Tí gevur tað bert meining í so máta at sammeta Føroyar við sjálvstøðug lond ella statir.

**Fólkatal millum 16-66 ár og 67+ ár, og lutfallið 16-66 ár gomul og 67+ ára gomul** **Mynd II 1**




Tølini fyri 1986-2016 (1.1) eru uppgjørd tøl, meðan tølini 2017-54 eru frá seinastu fólkatalsframskriving Hagstovunnar

Ein sammeting av Føroyum við Danmark, Noregi og Sviaríki hvat viðvíkur aldursbýtinum í demografisku gongdini vísir sama tendens sum í Føroyum hvat viðvíkur aldursbýti, um enn tendensurin er nógv meira víðgongdur í Føroyum enn t.d. í Danmark. Harumframt er kynsbýtið nógv meira skeiklað í Føroyum. Umframt hetta skeiklaða kynsbýtið missa Føroyar støðugt fólk til útlond við at nærum helmingurin av

[34] Sí Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2015, síða 69-70.
[35] Kelda: Dátugrunnur Hagstovunnar, www.hagstova.fo undir "íbúgvar og val" og undir "fólkatalsframrokning". Framrokningin við "miðvirði" er vald sum tann mest sannlíka. Framrokningin er gjørd sum stokastisk framrokning, og tí framrokning við prediktiónsintervallum (95, 90 og 80). At framrokningin er stokastisk merkir at hon byggir á søgulig dátu. Framrokningin kann bara vísa trendin í fólkatalsgongdini og ikki-konjunkturtreytaðu sveiggini rundan um hendan trend. Sí annars frágreiðing frá Jón Joensen: Hvussu ávirkar flytingin fólkatalið, 6. Mai 2016 (fæst frá Hagstovuni).

teimum, sum í lestarørindum flyta til útlond, ikki flyta aftur til Føroya at búgva vegna tvørrandi starvsmøguleikar í Føroyum[36].

Búskaparráðið kann ikki koma longur við sínum royndum at svara omanfyri nevnda spurningi um avleiðingarnar av demografisku gongdini í longdini. Vit kunnu bert staðfesta, at nærkast nevnda lutfall 2, fer hetta at krevja stórar tillagingar - so ella so. Hetta er eitt dømi um at arbeiði Búskaparráðsins er komið hagar til, at tað avdúkar ein størri granskingartørv á økinum. Fyri at svara omanfyri nevnda spurningi má gransking sostatt taka yvir - gransking sum Búskaparráðið ikki sjálvt hevur fíggjarliga orku ella játtan til at útinna.

Sama er at siga um spurningin um føroyska arbeiðsmarknaðin og møguleikanum fyri fólkavøkstri í Føroyum gjøgnum størri nettotilflyting av fólki í skattgjaldandi aldursbólkum. Búskaparráðið gav eina lýsing av hesum spurningi – so langt sum til bar hjá ráðnum - í búskaparráðsfrágreiðingini á vári 2016. Í greiningini av einum slíkum máli kann Búskaparráðið heldur ikki her fara longur enn til eitt ávíst mark. Tá ráðið er komið til hetta mark, má gransking eisini í hesum føri taka yvir til tess at gera meira djúptøkar greiningar við støði í nýggjum dátum og viðgerð av hesum dátum. Búskaparráðið hevur ikki játtan til meira.

Eyðsæð er tað sama galdandi fyri onnur málsøki, ið Búskaparráðið partvíst hevur roynt at varpa ljós á. Til dømis við eini neyvari greining av framtíðar livimøguleikunum hjá teimum ymsu bólkunum av pensionistum í Føroyum[37] samanborið við tilsvarandi livikor hjá pensionistum í grannalondunum. Í grannalondunum kunnu vit rokna við at eitt vaksandi tal av pensionistum við stórari keypiorku fer at styðja upp undir ein øðrvísi og møguliga størri nýtslueftirspurning, ið fær týdning fyri búskskaparvøksturin[38]. Neyvan fer tað sama at gera seg galdandi í Føroyum; sum áður nevnt vita vit at føroyska pensiónsuppsparingin í 2011 lutfalsliga bert var brotpartur av pensiónsuppsparingini í grannalondunum [39]. Møguleikin at "fáa aftur" grannalondini í so máta við tí nýggju føroysku pensiónsskipanini eru avmarkaðir vegna ymisk byrjunartíðspunkt, men í hvønn mun vita vit ikki.

Mynd II 2 vísir søgulig tøl og framroknaði tøl av deyðum, føddum og av burðaravlopinum (muninum millum talið av føddum og deyðum). Framrokningin frá 2016 er gjørd við grundstøði í aldurstreytaðum føði- og deyðstíttleika í 2015[40]. Føðitíttleikin millum føroyskar kvinnur hevur verið sera stórur sammett við grannalondini, men lutfalsliga lítla talið av burðardyggum kvinnum í Føroyum hevur gjørt at føðitalið kortini ikki hevur verið so stórt. Kemur føðitíttleikin í Føroyum at líkjast føðitíttleikunum í grannalondunum, eru framroknaðu føðitølini ov bjartskygd.

[36] Búskaparráðsfrágreiðing á heysti 2014, síðu 55-56; Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2016, síðu 52.
[37] Arbeiðsbólkurin viðvíkjandi pensiónsnýskipan leggur tó fram eina greining av livikorunum hjá ymsum bólkum av pensionistum í Føroyum, og skattanýskipanarbólkurin eisini.
[38] "Older consumers will reshape the business landscape", The Economist, April 9th 2016, p. 60
[39] Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2015, síðu 64-65.
[40] Kelda: Dátugrunnur Hagstovunnar á www.hagstova.fo og tøl frá Hagstovuni um aldurtreytaðar føði- og deyðstíttleikar í 2015.

**Fødd, deyð og burðaravlop 1985-2054 (forsøgn frá 2015)** **Mynd II 2**




**Viðm.:** Forsøgnin frá 2016 og fram er gjørd við aldurstreytaðum føði- og deyðstíttleika í 2015.

**Kelda:** Hagstovan

Mynd II 2 vísir at framroknaða burðaravlopið gerst negativt frá 2035. Negativt burðaravlop er vanligt í nógvum útryðjuøkjum í grannalondunum, men hesi øki kunnu Føroyar sum áður nevnt ikki sammetast við, tí Føroyar hava átikið sær ábyrgdina av egnum almennum inntøkum og almennum útreiðslum.

## II 1.6 Møta demografisku avbjóðingini við vøkstri í strukturellum arbeiðsvirkni?

Búskaparpolitisk inntriv til tess at rætta upp á fíggjarliga haldførið - við omanfyri nevnda vísitali fyri negativum haldføri útroknað - eru ikki smávegis inntriv. Einføld tiltøk, ið ikki kosta nøkrum nakað (sum til dømis hildið var í sambandi við forskattingina av pensiónum), finnast ikki í hesum høpinum. Annars er tað soleiðis, at jú seinni inntriv verða gjørd, jú størri verður kravið til støddina á inntrivunum.

Eitt annað sjónarhorn til haldføris-trupulleikan er tann einfalda staðfesting, at í mun til pensionistatalið fara vit at hava "ónormalt fá" fólk í arbeiðsvirknum aldri. Tað vil siga, at í mun til kravdu støddina á almenna geiranum fara vit at hava *eitt ov lítið vinnulív og tískil ov fá vinnuliga arbeiðspláss*, sum við sínum skatta- og avgjaldsgrundarlagi kunnu halda uppi almenna geiranum.

Búskaparpolitisk inntriv til tess at bøta um haldførið við at skerja útreiðslur/vaksa um inntøkur hins almenna, koma neyðturviliga at kosta nøkrum nógv. Tørvurin á inntrivum av hesum slagi kundi verið minkaður, um til bar at skapa ein munandi vøkstur í ikki-konjunktur-treytaða arbeiðsvirkninum, t.v.s. *strukturella arbeiðsvirkninum* í Føroyum. Ein slíkur politikkur vildi sett krøv um økta nettotilflyting.

Ein munandi vøkstur í ikki-konjunktur-treytaðum *arbeiðsvirkni* í Føroyum - strukturellum arbeiðsvirkni - og harvið ikki-konjunktur-treytaðum (men strukturellum) *skatta- og avgjalds-inntøkum*, er í hvussu er ein ástøðilig (teoretisk) loysn av haldføris-trupulleikanum hjá almenna geiranum í Føroyum. Um slík loysn letur seg gera í praksis er ein annar spurningur.

Minkaða fráflytingin og vaksandi tilflyting í seinastuni hava skapað eitt ávíst bjartskygni um gongdina. Til hetta er at siga at hendan gongdin fyri ein part er ávirkað av fyrimunarligu konjunkturgongdini í seinastuni. Søguliga hevur ongantíð komið fyri, at ein vend ikki fyrr ella seinni er hend í konjunkturunum. Tær framrokningar Búskaparráðið hevur nýtt snúgva seg um roknaða *trendin* í gongdini; upp um ein *trend* og niður um ein *trend* hava altíð verið konjunkturtreytaði sveiggj.

# Kapitul III  Kommunubúskapurin

## III 1.1 Søguligar dagføringar á kommunala økinum

Grundgevast kann fyri at við heimastýrislógini frá 1948 er føroyska kommunu-hugtakið innihaldsliga gjørt til nakað annað enn kommunu-hugtakið í Danmark. Við heimastýrislógini varð lóggivið um eitt nýtt slag av almennum myndugleika - eitt nýtt slag av kommunum - í Føroyum[41]. Sum við øllum í heimastýrislógini var grundgevingin at viðurskiftini í Føroyum eru nógv øðrvísi enn viðurskiftini í Danmark.

Høvuðsmunurin millum føroyska og danska kommunuhugtakið er at eftirlitsmyndugleikin hjá státinum er grundlógarfestur fyri donsku kommunurnar. Fyri føroysku kommunurnar er eftirlitsmyndugleikin hinvegin í heimastýrislógini lógarfestur at vera hjá heimastýrinum (landinum). Grundgevast kann tí fyri, at føroysku kommunurnar ikki eru kommunur í grundlógarinnar týdningi, men ein í 1948 nýskapt "myndugleika-konstruktión". Tá eftirlitið við føroysku kommununum varð flutt frá amtmanninum til heimastýrið í 1948, var sostatt skilmarkað eitt nýtt kommunuslag, ið staturin ikki ábyrgdaðist av, men bert landið sum eftirlitsmyndugleiki. At hetta ikki er týdningarleyst, er m.a. váttað í tí dómi, sum ein føroysk kommuna fekk, tá hon í 1993 sendi rættinum umbøn um at verða tikin undir trotabúgvarviðgerð[42]. Her varð staðfest at *"tilsynsmyndigheden tager vare på at en kommune kan opfylde sine økonomiske forpligtelser"*.

Serføroyska kommunu-hugtakið hevur annars sínar søguligu røtur aftur í 19.øld, byrjandi við kirkjusóknarstýrum og seinni nógv ávirkað av markatalsbygda-býtinum (og grannastevnueindini).

Serføroyska kommunuhugtakið er eisini sermerkt við at nýggir almennir myndugleikar kunnu spretta fram úr samarbeiðinum millum kommunur uttan at politiska skipanin gevur avleiðingunum stórvegis gætur. Hetta hendi á eldrarøktarøkinum 2015. Tá kom eitt nýtt kommunalt myndugleikaslag inn í almenna geirabýtið, soleiðis at hetta geirabýtið nú fevnir um (1) land, (2) kommunur, (3) almannagrunnar, (4) ríki, og sum nakað nýtt - (5) økiseindirnar innan eldrarøktina (sum eisini eru samanfallandi við kommunalu samstarvsøkini fyri barnaverd)[43]. Sum eitt kuriosum kann nevnast at hetta nýggja uppbýtið hevur gjørt tað nógv meira krevjandi hjá Hagstovu og Gjaldstovu at skipa roknskapin fyri allan almenna geiran. Tær ofta torgreiddu koncern-elimineringar, ið neyðugar eru fyri at seta upp ein rættan roknskap fyri almenna geiran (koncernroknskap), eru vaksnar stórliga í tali og í slagi.

## III 1.2 Greiningar og álit um kommunuviðurskifti

Heimastýrislógin avmarkar á ongan hátt Løgtinginum í at fylla út serføroyska kommunu-hugtakið júst sum Løgtinginum lystir. Ein annar spurningur er um lands-politikararnir hava verið nóg fermir í at fylla út hetta serføroyska kommunu-hugtakið í samsvari við serføroysku umstøðurnar, og soleiðis at samvirkanarárinini millum kommunur og land verða so gagnlig sum møguligt.

Tað liggur eitt sera rúgvusmikið skrivligt tilfar eftir nógvar arbeiðsbólkar - sum útgreiningar og álit á kommunuøkinum gjøgnum árini, sí tekstkassa 5. Tað er tí merkisvert, at tá eldrarøktar-økið varð flutt

---

[41] Grein 89 í tí í 1948 galdandi grundlóg: "Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov". Hendan í grundlógarinnar grein 89 kravda lóggávan um kommunuskipan kann fyri Føroya viðkomandi møguliga sigast vera heimstýrislógin frá 1948, sum á lista A um føroysk sermál ásetur: *"Kommunal mál. Herundir hoyra stjórnan av kommununum, eftirlit við teimum, kommunuskattur."* Í hvussu er, er føroyska kommunu-hugtakið uttan statseftirlit gjørt til nakað annað enn danska kommunu-hugtakið, ið krevur statseftirlit. Tí kann verið grundgivið fyri at føroysku kommunurnar ikki eru kommunur í grundlógarinnar týdningi, men at føroyska kommunu-hugtakið er ein "nýggj konstruktión", ið er gjørd til høvið - og fyri at tryggja samsvar millum grundlóg og heimastýrislóg.

[42] U.1994.137/2 Færøsk komune kunne ikke træde i betalingsstandsning.

[43] Talan er um 7 øki, sum hava stovnað hesar tænastur:

Norðuroyar bú- og heimatænasta
Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu
Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum
VEKS-samstarvið innan eldrarøkt og heimatænastu millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur.
Heimatænastan í Vágum
Økistænastan í Sandoyar Sýslu
Bú- og heimatænastan í Suðuroy

Umframt Tórshavnar kommunu sum 8.økið

frá landi til kommunur, var ein fíggjarleistur nýttur, sum ongantíð hevði verið viðgjørdur í rúgvismikla útgreiningararbeiðinum hjá embætisfólkunum.

## Tekstkassi 5
## Útgreiningararbeiði viðvíkjandi kommununum

Hesi seinastu 25 árini eru nógvar frágreiðingar og nógv álit um kommunumál løgd fram av embætisfólkum í landsumsitingini.

Í september 1996 var løgd fram ein verkætlan um nýggja kommunala skipan[44]. Í framhaldi av hesum var í november 1997 løgd fram frágreiðing um verandi kommunala uppgávu- og ábyrgdarbýtið[45]. Í framhaldi av hesum var í juni 1998 løgd fram ein søgulig lýsing av øllum táverandi kommunum í Føroyum, og ein eftirmeting av hvussu kommunalu uppgávurnar vórðu loystar[46]. Í framhaldi av hesum var í september 1998 lagt fram álit við niðurstøðu og tilmæli um nýggja kommunuskipan[47]. Í 2000 var barnaansingin skipað sum kommunumál, og har fígging var veitt frá landinum við frítøku frá ymiskum kommunalum gjaldsbýtum á almannaøkinum[48]. Í oktober 2000 setti Almanna- og Heilsumálaráðið ein arbeiðsbólk til tess at lýsa og viðgera eldraøkið í síni heild. Álitið frá hesum arbeiðsbólki varð nakað seinkað lagt fram í 2002[49]. Annars varð í oktober 2000 avgjørt at halda áfram við arbeiðinum við at umskipa viðurskiftini millum land og kommunur sum ein verkætlan hjá einum arbeiðsbólki. Í desember 2001 legði hesin arbeiðsbólkurin fram eitt álit um staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur[50]. Á hesum grundarlagi hendi kortini einki, og í januar 2009 varð sett ein kommunal umskipanarnevnd, sum legði fram sítt álit í september 2009[51]. Á hesum grundarlagi hendi tó einki bráðfeingis. Fólkaatkvøðan í mai 2012 um kommunusamanlegging minkaði møguleikan fyri kommununýskipan við samanlegging av kommunum. Hetta síðstnevnda um kommunu-samanlegging hevði verið ein fortreyt fyri meginpartinum av útgreiningararbeiðinum viðvíkjandi kommununýskipanum.

Endiliga varð í 2015 eldrarøktarøkið flutt frá landi til kommunur við einum fíggingarleisti, sum ongantíð hevði verið viðgjørdur í rúgvismikla útgreiningararbeiðinum hjá embætisfólkunum.

Fíggingarleisturin fyri kommunalu yvirtøkuna av eldrarøktini bygdi á eina lutfalsliga einfalda inntøku- og útreiðslukravs-javnandi blending av endurgjaldi (refusión) og blokkstuðulsskipan við:

(1) forskatting av pensiónum, og har forskattingin var flutt sum inntøka til kommunurnar í samsvari við talið av 67-ára gomlum og eldri í hvørjari kommunu, tó við serskipan fyri Sandoy[52], og
(2) við eini útjavnandi kompensatión til kommunur vegna serligar frádráttir og serskattaskipanir (tvs. ein inntøkujavning uttan nýtslu av aldurskriterium í útberingini), og
(3) við einum fyribils skiftistíðarstuðuli til og við 2017 til fíggjarligar veikar kommunur

Øll útberingar-upphæddin varð ikki ásett eftir staðfestum tørvi á eldrarøktarøkinum, men eftir hvussu nógv kom inn við forskatting av pensiónum, og hvat serligir frádráttir og serskattaskipanir týddu fyri mistan kommunuskatt. Ein slík skipan er ikki í samljóði við møguleikan at áseta kommunalar játtanarkarmar (útreiðsluloft) við atliti til yvirskipaða stýring av nýtslunu í almenna geiranum.

Flytingin av eldrarøktarøkinum landi til kommunur skapti eisini nýggj markamót millum landsábyrgdir og kommunuábyrgdir, og har ábyrgdarbýtið tískil kundi elva til iva. Greiða var fingin á hesum við

[44] Kommununevndin: Verkætlan – ein nýggj kommunal skipan í Føroyum, September 1996
[45] Kommununevndin. Uppgávu- og ábyrgdarbýtið, nýggj kommunal skipan, táttur I – partur I, November 1997
[46] Kommununevndin. Frágreiðing um kommunurnar í Føroyum. Nýggj kommunal skipan, táttur I – Partur II, juni 1998
[47] Kommununevndin. Nýggj kommunuskipan, niðurstøða og tilmæli, táttur II, september 1998
[48] Løgtingsmál 30/1999: Avtøka av løgtingslóg nr 125 frá 21.mai 1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m.
[49] Eldrabólkurin: Álit um eldraøkið. Lýsing og meting av eldraøkinum; framtíðar skipan av eldraøkinum; dagføring av eldraøkinum; uppgávu- og ábyrgdarbýtið millim land og kommunu, 2002.
[50] Arbeiðsbólkurin: Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, desember 2001.
[51] Innlendismálaráðið: Kommunur, eindir og uppgávur, september 2009
[52] Kommunurnar frásøgdu sær samstundis rættin til ein part av avgjaldinum av kapitaleftirlønum

einum sáttmála millum Almannamálaráðið & Heilsu- og Innlendismálaráðið og Kommunufelagið í mai 2016[53].

## III 1.3 Stutt yvirlit yvir kommunalar uppgávur

Niðanfyri standandi málsøki eru kommunalar uppgávur[54] og uppgávur sum kommunurnar bera útreiðslurnar av:

- *Barnavernd (nú undir kommunalari økissamvinnu í økjum ikki minni enn 3000 íbúgvar. Barnaverndarøkini fella saman við eldrarøktarøkini)*
- *Almannahjálp (fátækrahjálp fyrr) var upprunaliga týðandi kommunuuppgáva, men er ikki longur kommunal uppgáva/ útreiðslubyrða, men fram til 2000 hava kommunurnar goldið sín part av almannaútreiðslunum.*
- *Høli, tól og innbúgv v.m. í viðtaluhølum kommunulækna - partur av føstu grundløn kommunulækna verður nú goldin av Heilsurøkt.*
- *Høli til heilsufrøði til børn og ung (Gigni), fyribyrgjandi læknakanningar*
- *Hvíldarheimspláss (rekreatión)*
- *Fólkayvirlit*
- *Val og vallisti*
- *Grindalistin*
- *Sløkkilið og tilbúgvingarmál*
- *Byggi- og býarskipan, byggiloyvi*
- *Kloakkir*
- *Havnir og lendingar*
- *Gøtuljós*
- *Vatnveiting*
- *Spillvatn*
- *Ítróttarøki (sambært siðvenju), spælipláss*
- *Kommunalir vegir, asfaltering*
- *Rindan av parti av rentustuðuli*
- *Kommunalar politiviðtøkur*
- *Byggibúgving (ofta søla fyri minni enn kostnað)*
- *Vetrarfriðingar, hegnsýni, skaðadjóratýning*
- *Eftirlit við hundum, eftirlit við matvørulógini á staðnum*
- *Kirkjugarðar*
- *Bygdasøvn, viðlíkahald av varðum millum bygdir*
- *Skúlatannlæknar (upp til og við 16 ár, allar útreiðslur)*
- *Renovatión (IRF/KOBA)*
- *Skyldu at veita SEV lendi til leidningar*
- *Íløgur í fólkaskúlabygningar í samsvari við reglurnar um undirvísingarskyldu (fyrr endurgoldið uml. 50% frá landi, men hetta helt uppat í byrjan av 90-unum)*
- *Rakstur av skúlabygningum: vask, el, hiti, telefon, viðlíkahald og tilfarsnýtsla, skúlabókasøvn*
- *Frítíðarundirvísing, musikkskúli*
- *Skúlabarnakoyring (endurrindað helvtina frá Mentamálaráði)*
- *Barnansing (Kommunalmál frá 2000). Fígging var veitt frá landinum við frítøku frá ymiskum kommunalum gjaldsbýtum á almannaøkinum*[55]
- *Eldrarøkt, herundir eldrasambýli, røktarheim og heimahjálp, og herundir allar íløgur á eldraøkinum, og eisini heimasjúkrarøkt v.m. sum liður í primerari heilsurøkt, og*

[53] Markamótskjalið: sáttmáli millum Kommunufelagið og Landsstýrið, mai 2016.
[54] Smb. arbeiðsbólki um "Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur", Desember 2001. Smb. við álit frá arbeiðsbólki um "kommunur, eindir og uppgávur", Oktober 2009. Listingin niðanfyri av kommunalum uppgávum og ábyrgdum er ikki neyðturviliga 100% fullfíggjað og raðfylgjan er tilvildarlig.
[55] Løgtingsmál 30/1999: Avtøka av løgtingslóg nr 125 frá 21.mai 1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m.

*ansingarsamsýning og umsorganararbeiði (kommunalmál frá 2015). Kommunurnar eru her tvingaðar inn í samarbeiði í eldrarøktar-økjum við ikki færri enn 3000 íbúgvum, og hesi eldrarøktar-øki kunnu sigast vera eitt nýtt kommunalt myndugleikaslag. Fíggjarleisturin kann sigast at umboða eina ótraditionella loysn (sí tekstkassa 5).*

Kommunala skattaprosentið var fyri nøkrum áratíggjum síðani eitt eitt-sifrað tal. Tá krøvini blivu størri til skúlatannlæknar, renovatión og skúlabygningar (m.a. longd undirvísingarskylda) o.a., vaks prosentið, og fór nógvastaðni upp um 20%.

Annars hendu ikki so nógvar broytingar á kommunala økinum fram til 2000, tá barnaansing gjørdist kommunalmál burturav, og har fígging frá landinum fylgdi við. Fyri barnaansingina var funnin ein umsitingarliga ómakaleysur fíggingarleistur (frítøka frá kommunalum gjaldsbýtum á almannaøkinum), sum tó ikki tók atlit til útjavning millum kommunur[56].

## III 1.4 Royndirnar frá eldrarøktar-økinum – niðurstøður og tilmæli

Næsta stóra broytingin á kommunala økinum, eftir at dagstovnaøkið var yvirtikið, var kommunala yvirtøkan av eldrarøktarøkinum frá landinum í 2015. Hetta er ivaleyst størsta nýskipan á kommunuøkinum síðan 1948, mált í flyting av peningi og starvsfólkatali.

Eldrarøktarøkið skuldi hereftir í høvuðsheitum fíggjast við peninginum frá forskattingini av pensiónum (størsti parturin av upphæddini), ið varð lutaður út til kommunurnar eftir hvussu nógvar 67-ára gamlar og eldri borgarar kommunan hevði, og omaná hetta kom ein skipan, ið endurrindaði kommunum fyri tap av kommunuskatti vegna borgarar í kommununi undir serskattaskipanum (minni parturin av upphæddini). Meira nágreiniliga var fíggjarleisturin hesin:

1. Skatturin frá forskattingini av pensjónum fellur til tær einstøku kommunurnar frá 2015 og frameftir[57]. Útborið verður til kommunurnar samsvarandi talinum av borgarum í kommununi, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri[58], tó fær Sandoyar kommuna 30% meira enn hinar[59]. Her er talan um eina roynd til útjavning vegna útreiðslutørv (kommunur við lutfalsliga fleiri eldri yvir 67 ár fáa lutfalsliga meira). Upphæddin í 2015 var 277 mió. Kr.[60] [61]
2. Gjald frá búfólki á røktarheimum og sambýlum og fyri heimahjálp verður inngjald at nýta hjá viðkomandi kommunala samstarvsøki.
3. Serveiting frá landinum sum endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir hjá borgarum kommunanna. Kommunurnar fáa eftir hesi serveiting endurgoldið 19,1% av DIS-inntøkuni, FAS-inntøkuni, fiskimannafrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum annað árið fyri[62]. Hetta er eisini ein partvís útjavning vegna ójavnt inntøku-skattagrundarlag í kommununum – lutfalsliga fleiri sum hava hesar frádráttir búgva í inntøkuveikum kommunum[63]. Útlutað verður eftir tí, sum kommunurnar av hesum ávum hava "mist" í skatti, og IKKI eftir talinum av pensionistum. Fyri árið 2015 bleiv hendan upphæddin 113 mió. kr[64].
4. Ein serligur skiftistíðarstuðul til fíggjarligar veikar kommunur upp á 25 mió í 2015 og 10 mió. í 2016, og sum fellur burtur í 2017[65]. Hetta er ein serstuðul at endurgjalda fyri eykaútreiðslur í sambandi við yvirtøkuna, og at endurgjalda fyri aðrar mismunir tá tað snýr seg um inntøkur og kostnaðir.

Hvat henda yvirtøka við hesum fíggjarleisti í longdini kemur at týða fyri kommunala búskapin og tænastustøðið er eitt sindur óvist. Broytta aldursbýtið og eldingin av føroysku búfjøldini, og tann skapti fíggjarleisturin fyri hesa yvirtøku, skapa ein ávísan iva. Gongdin í 2015 og higartil í 2016 vísir at

[56] Ibid.
[57] Dagførda fíggjarlógin 2015 s. 374
[58] Løgtingslóg nr. 20 2014, § 10, og løgtingslóg nr. 134 frá 19. Desember 2014
[59] Løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014
[60] Landsroknskapurin 2015, s. 178
[61] Ein partur av fíggjarleistinum var eisini at kommunurnar frásøgdu sær rættin til ein part av avgjaldinum av kapitaleftirlønum.
[62] Løgtingslóg nr. 136 frá 19. Desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir.
[63] Kelda: Føroya kommunufelag.
[64] Løgtingslóg nr. 136 2014. Dagførda fíggjarlógin 2015, s. 389. Landsroknskapurin 2015, s. 185.
[65] Dagførda fíggjarlógin 2015, s. 389

fíggingarleisturin fellur út sera ymiskt á tær ymsu kommunurnar - summar hava yvirskot av fíggjarleistinum, og aðrar hava undirskot – men tá má eisini takast atlit til útreiðsluvøksturin frá 2014 til 2015 hevur verið óvanliga stórur[66].

Ein stórur trupulleiki við fíggingarleistinum er at allur útreiðslukravstørvurin á eldrarøktar-økinum ikki neyðturviliga er tengdur at hvussu nógv kemur inn í forskatting av pensiónum. *Hesi tvinni viðurskiftini hava fyri so vítt onki við hvørt annað at gera.* Heldur ikki er kommunali útreiðslukravstørvurin á eldrarøktar-økinum neyðturviliga tengdur at hvussu nógv 67-ára gomul og eldri búgva í eini kommunu - ivaleyst er tørvur á fleiri útlutingarkriterium. Sama er galdandi fyri javningina fyri lutfalsligum inntøkumunum; hesir munir stava sjálvsagt ikki bara frá ymiska talinum av kommunu-borgarum við serligum frádráttum og serskattaskipanum.

Hesin fíggjarleisturin samljóðar sostatt ikki við tørvin á yvirskipað at stýra kommunala búskapinum við at áseta játtanarkarmar (útreiðsluloft) fyri kommunalu nýtsluni, og at lóggeva um avleiðingar, um karmarnir ikki verða hildnir. Hetta er vanliga reglan í grannalondunum, har samskipað búskaparstýring fer fram av øllum tí almenna geiranum.

Landbúskapurin verður stýrdur við játtanarkarmum (útreiðsluloftum), tó uttan nøktandi reglum um avleiðingar, tá farið verður út um játtanarkarm. Við útlegging av eldrarøktini til kommunurnar vórðu stórar upphæddir fluttar frá landsins fíggjarstýring við játtanarkarmum (útreiðsluloftum), og til kommunala fíggjarstýring uttan játtanarkarmar ella útreiðsluloft.

Ivasamt kann vera at síggja tað búskaparliga fyrimunarliga í, at kommunurnar yvirtóku eldrarøktina frá landinum.

<u>*Politiskt*</u> ber væl til at skilja nýskipanina. Fyrr fíggjaði landið hesar røktarheimsíløgur við studningi / stuðulslánum, meðan uppgávan og ábyrgdin nú liggur hjá kommunal-politikarunum.

Roknast kann við at raksturin av fleiri nýggjum eldrarøktareindum ivaleyst kemur at kosta meira, tá sammett verður við, hvat ein einstøk umsitingarlig eind fyri alt landið kostar í rakstri (mistir stórrakstrarfyrimunir í t.d. starvsfólkaumsiting og roknskaparhaldi og størri sannlíki fyri gegnistrupulleikum í minnu eindunum).

Konjunkturviðgangandi politikkur hevur í Føroyum verið reglan og ikki undantakið. Í hesum sambandi hevur verið ført fram frá kommunalari síðu, at kommunustýrislógin hevur sum undirskilta fortreyt, at kommunurnar hava skyldu til at nýta peningin, ið inn kemur í kommunukassarnar, til nýtslu og íløgur, og ikki at goyma hendan pening[67].

Hetta átti at givið landspolitikarunum høvi til at broyta lóggávuna soleiðis, at umframt kommunal útreiðsluloft (játtarnarkarmar) og hámarks og lágmarks kommunuskattaprosent fyri hvørja kommunu, verða ásettar reglur um kommunalar kassabindingar, og reglur fyri staðseting av árligum kommunalum roknskaparavlopum.

Var ein slík nýskipan gjørd við dagføring í kommunustýrislógini, kundi hetta eisini givið høvi til broyting í grein 54 í somu lóg um avmarking av støddini á nettoskuld kommununnar til eina nettoálíkning. Hetta mark kundi verið minkað til minni enn eina heila nettoálíkning. Ein slík herðing hevði verið forsvarlig, tá kommunurnar vórðu eggjaðar ella noyddar til at goyma/spara roknskaparavlop frá "góðum tíðum" til seinni brúk í "verri tíðum".

Viðurskiftini í Føroyum eru smá, fólkatalsliga er landið alt ikki størri enn ein kommuna í grannalondunum. At nýta kommunur í grannalondunum og teirra málsøkjaábyrgdir sum fyridømi fyri føroysku kommunurnar er ikki hóskandi.

[66] Sambært Gjaldsstovuni hevur vøksturin í rakstrarútreiðslunum í 2015 verið 8 %.
[67] Samrøða í KVF við borgarstjóra í juni 2016.

## III 1.5 Málið um kommunala útjavning (á inntøkusíðu- og útreiðslutørvssíðu)

Eitt yvirskipað mál í tænastuveitingum kommunanna til borgararnar má vera at munurin í tænastustøðinum ikki fer upp um ella niður um ávíst mark, uttan mun til hvar í landinum og í hvørjari kommunu ein borgari býr. Yvirskipaða málið er sostatt eitt javnt gott tænastustøði saman við góðum virkisføri og sámiligum kostnaðarstøði í øllum kommunum.

Vanligastu regluløgini fyri kommunala útjavning eru (1) *endurgjald (refusión)* frá landinum, (2) *blokkstuðul* frá landinum eftir objektivum kriterium, og (3) *millumkommunal útjavning*. (4) Í Føroyum er ein fjórði hættur møguligur og viðkomandi at nýta. Hesin er her at koma *eitt stig á leiðini til størri kommunala útjavning gjøgnum kommunusamanleggingar*.

Bæði ein *millumkommunal útjavning* og ein *blokkstuðuls-útjavning* hava vanliga nógv útjavningarkriterii og samanvigingar av kriterium, og blendingar av øllum leiðreglum verða vanliga nýttir. Tær seta eisini krøv til eitt nágrannt hagtalsgrundarlag, sum vit ofta ikki hava tøkt í Føroyum. Hervið gerast hesir útjavningarhættir "byrokratiskir", og harvið torgreiddir í sínum uppbygnaði[68]. Tá hesir útjavningarhættir verða nýttir aðrastaðni, fevna tey sjálvsagt um allan kommunala búskapin.

Við nógvu lítlu og støddarmunarstóru kommununum í Føroyum vildi vinningurin av eini kommunalari útjavningaskipan fyri allan kommunubúskapin eftir útlendskum leisti helst ikki staðið mát við innsatsin.

Munadyggasti og ómakaleysasti mátin til tess at koma eitt sindur ávegis við størri kommunalari útjavning í Føroyum – eina útjavning ið fevnir um allan kommunubúskapin - er ivaleyst ein hóskandi samanlegging av kommunum, t.d. ein samanlegging í samsvari við eldrarøktar-økini.

